# FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 335 Hósdagur 3. februar 2005 12,-


Síða 11



## Ran farin fyrsta túrin
Enn eru knotur í føroyingum


100% tryggleika?



Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!

Mobil Oil Føroyar

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

petur & petur • 320870


# 90 ár síðani skaða- grindina í Sandvík

13. februar eru liðin 90 ár síðani ringastu skaðagrind í søguni. Vit hava íkast til hesa søgu

Síða 9





Vit selja DAEWOO bátamotorar
frá 70 hk til 1.000 hk



DAEWOO

Umboð: Thorleif Samuelsen
Undir Gráasteini 68 · Tórshavn
Tlf: 31 77 13 · Fartlf: 28 31 38
E-mail: thorsam@post.olivant.fo


## Meira lønandi at taka livur
Prísurin farin uppá 5 krónur.

Síða 19

Soleiðis verður vinnan raðfest:

## Má bíða eftir fólkatingsvalinum!

Kreppurakta rækjuvinnan má bíða eftir einum vali uttan stórvegis týdning.

Síða 3


KÄRCHER



Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.

Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42







## Kvettroynd hjá landsstýrinum uttan grundarlag

Ætlanin at fáa grunnar sum Realin og ALS á fíggjarlógina aftur eitt dømi um rættarloysið í landinum.

Síða 18

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
telduposstur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin

- kemur út annanhvønn hósdag

mammu'sa

# Hýsumarknaðurin í vanda

Uppsamarknaðurin hevur leingi verið sera trupul. Nú vænta marknaðarserfrøðingar at tað sama kann henda á hýsumarknaðinum. Altjóða veiðan eftir hýsu fer at vaksa óvanliga nógv næstu árini, og tí er vandi fyri at botnurin fer undan marknaðinum.

Uppsamarknaðurin hevur leingi verið sera trupul, og tí valdi Ráfiskakeyparafelagið herfyri at hyggja nærri at trupulleikunum á einum temadegi um upsamarknaðin.

Men tað er ikki bara upsamarknaðurin sum er trupul, tað er hýsumarknaðurin eisini. Væl meira er fiskað av hýsu í stóru veiðutjóðunum, og hetta hevur fingið prísin at falla. Seinastu fimm árini er prísurin fallin 60% (norsk tøl).

Tað síðsta nýggja er, at Canada og USA rokna við, at samlaða hýsukvotan á "Eastern Georges bank" fer at økjast úr 15.000 tonsum í fjør til heili 175.000 tons í 2007.

"Hetta kann í ringasta fallið merkja, at hýsumarknaðurin kollapsar" sigur Edmund Mikkelsen, ið er marknaðaranalytikari hjá Eksportutvalget for fisk.

Tað er 2003 árgangurin av hýsu, sum fiskifrøðingar í USA og Canada meta vera sera stóran. Teir samanbera við søguliga stóra 1963 árgangin, og teir vænta, at veiðan kemur í hæddina í 2007. Samstundis var 2000 árgangurin eisini sera stórur, og hetta kann merkja søguligt met í hýsuveiðuni.

Stóru marknaðirnir fyri hýsu eru USA og Stóra Bretland. 70 og 80 prosent av øllum innflutninginum av hýsu til ES marknaðin fer til Stóra Bretland, har stórar nøgdir verða brúktar til kenda bretska rættin "fish and chips". Serliga innflutningurin av óvirkaðari hýsu úr Noreg, Íslandi og úr Føroyum er øktur seinastu árini.

"Gongdin hevur viðført at hýsa, sum var ein dýrur hvítfiskur, nú er blivin ein partur av lágprís vørubólkinum" sigur Edmund Mikkelsen.

Men hvat fer at henda, um hýsuveiðan økist so nógv sum fiskifrøðingarnir vænta? Norska "Eksportudvalget for fisk" væntar, at stórar nøgdir av hýsu verða heilfrystar og sendar til framleiðslu í Kina. Síðani verður vøran innflutt sum hýsuflak til USA og Stóra Bretlandi, og hetta kann fáa hýsuprísin at falla enn meira.

USA og Canada eru vitandi um, hvat kann henda við hýsumarknaðinum, men enn er ógreitt hvat tey ætla at gera í hesum sambandi. "Møguliga halda hesi londini, at hýsan kann yvirtaka ein part av toskamarknaðinum. Men hetta letur seg illa gera, tí altjóða toskaveiðan er uppi á 850.000 tonsum, og tað er einki sum týðir uppá, at henda nøgdin fer at minka komandi árini. Einasti møguleikin er at veksa um marknaðin fyri hýsu, men hetta krevur munandi søluátøk," sigur Edmund Mikkelsen. "Gongdin bæði á hýsu- og upsamarknaðinum vísir, at stovnsrøktin í framtíðini eigur at taka hædd fyri marknaðarstøðuni," sigur hann.

Sølustjórin í einari av størru norsku fiskasølunum, Nordic Group AS, er eisini stúrin um hýsumarknaðin. "Eg havi fingist við hetta í 34 ár, og eg eri stúrin. Vit tosað um ein marknað, sum er rættiliga støðugur, og enn er hesin nøkunlunda í javnvág. Men tað skal ikki nógv til áðrenn prísurin verður ávirkaður" sigur Gustav Eidsaune. Og hann væntar als ikki, at hýsan kann koma inn á toskamarknaðin. "Royndirnar á bretska marknaðinum eru, at brúkararnir, sum keypa tosk halda seg til hesa vøru. Roynt hevur verið við stórum søluátøkum at selja hake og annan hvítan fisk í staðin fyri tosk, men hetta er miseydnað."

Umvælingar av bátum



Einasta góðkenda glasfiburbátasmiðjan í Føroyum.

Alt glasfiburarbeiði verður gjørt í góðkendum verkstaði.

Alt umvælingararbeiði á einum staði: leingjan av bátum, søla og íseting av motorum, - og so hava vit teir sera væl umtóktu slengrikjølarnar.

*Ring ella kom inn á gólvið.*

*Ein góð tænasta!*

**AWI BOATS SERVICE SP/F**
Rókahavnin 10 · FO-620 Runavík
Tel 448585 · Fartel 218585 · Fax 448785
awi@post.olivant.fo · awi.fo

Sveisi- og trygdarútgerð til skip



P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

# Nýggj manningarmynd

Latið okkum frætta, um onkur kennist við hesa manning.



Soleiðis verður vinnulívið raðfest:

# Rækjuflotin má bíða eftir fólkatingsvalinum!

Eftir hondini hildu vit okkum á FF at vera so garvaðar, at einki kundi kløkka okkum longur. Men tað tykist sum at politiska skipanin ferð eftir ferð kann yvirganga seg sjálva. Og tað kláraði hon so dyggiliga við síni fráboðan í Dimmalætting 21. januar um, at nú má ein loysn fyri rækjuflotan bíða til fólkatingsvalið er av.


Rækjumálið útsett til eftir valið

Fiskivinna: Eitt uppskot um hvussu trupulleikarnir hjá rækjuvinnuni skuldu loysast, er útsett til eftir fólkatingsvalið. Tað skuldi annars verið klárt í gjár

GEORG L. PETERSEN
georg@dimma.fo

– Vit hava avgjørt ikki at koma við nakrari niðurstøðu fyrr enn eftir valið, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.
Samgongan setti í desember mánaði ein bólk, sum skuldi koma við einum uppskoti um, hvussu trupulleikarnir í rækjuflotanum kundu loysast. Í bólkin vórðu valdir landsstýrismenninir Bárður Nielsen, Bjørn Kalsø og løgtingslimirnir Jóhan Dahl, Henrik Old og Jørgin Nielsen.
Niðurstøðan hjá bólkinum skuldi vera klár 20 januar, ella í gjár, hósdagin. Men í vikuni útskrivaði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, fólkatingsval

Hervið er so enn einaferð staðfest, at tað ger stórt sæð tað sama, hvør ið situr í eini samgongu ella í landsstýrinum. Og at tær vónir, sum kanska onkur hevði til sitandi landsstýrið, kunnu eftir hondini vera á einum sera lítlum staði.

Fyri at fara eitt sindur aftur í tíðina: Tað hevur leingi verið greitt, at rækjuveiðan er á gravarbakkanum. Hetta hevur fyrr verið at sæð við vinnum, men ofta vendir rákið, og so er tann vandin av. Hetta tykist at taka langa tíð fyri rækjuvinnuna, og tí kann vandi vera fyri, at rákið vendir ov seint, og tá kann vinnan fara í søguna með alla.

Tey eru fleiri, sum halda, at hetta vildi verið sera óheppið, fyri ikki at tala um eina vanlukku, fyri samfelagið. Millum hesi var sambandsflokkurin í andstøðu. Flokkurin leggur fram á ting uppskot um ein tíðaravmarkaðan stuðul til rækjuflotan, sum kanska kann bjarga honum.

So kemur valið, og flokkurin fær bæði fiski- og fíggjarmálaráðharran. Tað verður lagt til brots beinanvegin samgongan er skipað, og ein bólkur verður settur at arbeiða við møguleikunum fyri eini loysn. Nevndin fekk boð um at arbeiða skjótt. Men alt tekur longri tíð enn væntað, og til endans slapp nevndin at útseta freistina bert nakrar dagar í senn. Men 29. apríl varð álitið handað landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. So nú var tað upp til hansara og restina av landsstýrinum at gera skjótt av.

## Eingin skundur longur

Men nú er knappliga eingin skundur longur. Ikki fyrr enn út á heystið 2004 fær samgongan upp í lag at gera eitt uppskot, sum er grundað á tilmælið hjá bólkinum. Tá hendir tað, sum vit hava greitt frá í fleiri bløðum, nevniliga at løgmansskrivstovan, á einum sera tunnum grundarlag, ger eina niðurstøðu, sum sigur, at hetta uppskot er í stríð við altjóða lóg. At her er talan um undanstøkking, og eina roynd at tekkjast útlendskum áhugamálum móti okkara egnu, er væl og virðiliga prógvað í undanfarnum bløðum.

Undan jólum boðar løgmaður frá, at hann hevur sett ein politiskan bólk at gera eitt annað uppskot til loysn fyri rækjuflotan. Og hesa ferð skuldi berast veruliga skjótt at. Hesin bólkur fekk ein mánað, t.v.s. til 20. januar at koma við sínum boði. At bólkurin hevði sera avmarkaðar møguleikar vegna umrøddu niðurstøðu hjá løgmansskrivstouni er ein onnur sak.

Og nú hoyra vit, at hendan "loysn" er útsett vegna fólkatingsvalið, og skal bíða til hetta er farið aftur um bak. Hetta var tá heilt einastandandi. Freistin hjá bólkinum var 20. januar, og fólkatingsvalið var útskrivað 18. januar. Freistin at stilla upp er ein vika, so hevði nevndin gjørt sítt arbeiði, hevði hon sjálvsagt kunna gjørt seg lidna til ásettu tíðina. Men tað hevur hon eftir øllum at døma ikki gjørt.

Men so at fara at nýta fólkatingsvalið sum undanførslu fyri ikki at gera arbeiði liðugt, tað er nú tað grovasta ein hevur hoyrt. Hetta sigur nakað um prioriteringina hjá landsstýrinum. Eitt fólkatingsval í Føroyum má vera ein tann mest týdningarleysa hending, sum kann hugsast. Hetta snýr seg um eitt gott bein til tveir politikkarar, og eingin í umrødda bólki hevur annars nakran møguleika her.

Og so at seta hetta fram um arbeiðið at varðveita føroyskar vinnur við tilhoyrandi arbeiðsplássum. Ein saknar orð!

Tískil eru vit í dag, eitt ár eftir at samgongan varð skipað, longri frá eini loysn enn tá.

Takkað verið politiskum dugnaloysi og undanstøkking. So vánaligur er føroyskur politikkur.

## Fiskamarknaðurin hevur fundir kring landið

Sum kunnugt byrjaði nýggi fiskamarknaðurin Faroe Fish Market sítt virksemi 1. januar. Byrjanin hevur verið hampilig, men sum við øllum nýggjum fer tað at taka sína tíð at fremja allar tær ætlanir sum eru.

Fiskamarknaðurin ásanna, at tað er av stórum týdningi at kunna um sítt virksemi og at hitta fiskimenn, reiðarar, útróðrarmenn, fiskakeyparar og onnur, sum hava áhuga fyri hesum.

Tí er ætlanin at hava fundir kring landið fyri at gera tað møguligt at hitta flest møgulig áhugaði.

Fyrsti fundurin verður á Toftum. Hann verður á Svangaskarði kl. 19, og her eru øll áhugað vælkomin, og tað verður eisini ein drekkamunnur at fáa. Nevnd og stjórn vónar, at nógv møta upp og siga sína hugsan um, hvussu viðurskiftini kunnu gerast betri.

Ætlanin er eisini at hava ein fund 24. februar í Suðuroy. Hann verður helst í Øravík, men hetta verður lýst nærri.

Hon nýtist ikki at vera so
STÓR
Nei, lýsingin nýtist ikki at vera so stór fyri at síggjast - og tá kostar hon heldur ikki so nógv.
Gerið eina lýsingaravtalu við FF-blaðið og sparið 50%
Telefon: 31 15 69
ff-blad@post.olivant.fo

AGN
sild / kúfiskur
makrelur
høgguslokkur
einkultfryst gágga

hava dagligt samband um alt landið
P/F KAMBUR
STRENDUR · telefon: 447720
ella 448095 · fax: 448744
SENT VERÐUR VIÐ STRANDFERÐSLUNI

BAADER
Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.
Pf. Petur Larsen
Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

## Bjargingarútgerð

### á sjógvi og landi



*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð. Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*

- *Bjargingarbátar*
- *Bjargingarnet*
- *Yvirlivilsisdraktir*
- *Flótidraktir*
- *Bjargingarvestar*
- *Bjargingarkransar*
- *Epirbar/neyðsendarar*
- *Radartranspondarar*
- *Eldsløkkjarar*
- *Eldávaringar*
- *Branddraktir*
- *Umvælingar*
- *Eftirlit*

**P/F Gummibátatænastan**
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo



## Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945



J. PATURSSONAR GØTA 18




SAXO'FØN
TLF. 31 68 08



## MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64



## Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- *avrúsan og viðgerð*
- *einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)*
- *samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)*
- *eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi*

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75





## Vit hava stórt úrval av reiðskapi til línuveiðu

**Vit framleiða:**
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

***◆◆◆vælkomin inn á gólvið***

**SNØRISVIRKIÐ**
**í Klaksvík**
Tel. 455254 - Fax 457254
www.snorisvirkid.fo

**TEYMAVIRKIÐ**
**í Runavík**
Tel. 473000 - Fax 473001
www.teymavirkid.fo

# Um skyldu at geva upp skattskylduga inntøku fyri 2004

Øll, sum skulu verða sett í skatt, skulu geva upp skattskyldugu inntøku sína, áðrenn freistirnar nevndar niðanfyri eru úti.

## Til persónligar skattgjaldarar

Sjálvuppgáva og kapitalvinningssjálvuppgáva fyri 2004 hjá persónligum skattgjaldarum, ið ikki hava roknskaparskyldu, skal vera latin Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi

15. mars 2005.

Umleið hálvan februar verða sjálvuppgávur sendar út. **Øll, sum fáa eina sjálvuppgávu, skulu lata hana innaftur.**

Teir persónar, Toll- og Skattstovan heldur seg hava rættar upplýsingar um í fyribilsskattaskránni, fáa tó eina skattauppgerð, (eitt blátt skjal). Hesir persónar fáa onga sjálvuppgávu sendandi.

Eru upplýsingarnar á skattauppgerðini ikki rættar, skal sjálvuppgáva latast inn. Sjálvuppgávan fæst á økisskrivstovunum kring landið. Eisini er hon í bóklinginum 'Skattinum 2004', ið er sendur øllum húskum í januar 2005

### Framskundað skattauppgerð

Tey, ið **ikki** hava annan frádrátt enn eftirlønargjald og **ikki** hava B-inntøku, kunnu fáa framskundaða skattauppgerð, um tey innan 1. februar 2005 lata sjálvuppgávu inn. Á hesi sjálvuppgávu skal **bara gjaldið til eftirløn** í 2004 verða upplýst, og **skjalprógv skal leggjast við.**

Verða aðrar upplýsingar skrivaðar á sjálvuppgávuna t.d. B-inntøkur og/ella aðrir frádráttir, verður hon at rokna sum vanlig sjálvuppgáva. Tað merkir, at **skattauppgerðin væntandi ikki verður gjørd fyrr enn í fyrsta lagi í mars mánaði.**

### Ognaruppgerð

Tað er bara neyðugt at lata ognaruppgerð inn, um broytingar eru í ogn og skuld í mun til 31. desember 2003. **Tó skulu øll tey, sum Toll- og Skattstovan sendir ognaruppgerð, lata hana innaftur.**

## Til feløg v.m.

Sjálvuppgávur, roknskapir og inntøkur av kapitalvinningi viðvíkjandi árinum 2004 hjá deyðsbúgvum, feløgum, felagsskapum o.ø. við roknskaparskyldu skulu vera **økisskrivstovunum** hjá Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

1. juni 2005,

um roknskaparskeið teirra endar í ella fellur saman við álmanakkaárinum 2004.

### Umsókn um longda freist

Freistin verður bara longd tá serlig orsøk er til tess, t.d. sjúka. Skrivlig umsókn skal latast Toll- og Skattstovuni. Freistin verður givin eftir avtalu í styttri tíð í senn, men kann tó ikki verða givin longur enn til 15. august 2005.

Tá biðið verður um longda freist, skal hetta vera gjørt fyri hvørt felag sær, og harafturat verður kravt, at:

– umsóknin er innlatin í seinasta lagi **1. juni 2005**
– sjálvuppgávur og roknskapir fyri eldri ár eru komin inn.

## Til privat vinnurekandi

Sjálvuppgávur, roknskapir, ognaruppgerðir og inntøkur av kapitalvinningi viðvíkjandi árinum 2004 hjá privatum vinnurekandi við roknskaparskyldu skulu vera **økisskrivstovunum** í hendi sum tilskilað niðanfyri:

| Føðingardagur: | Seinasti innlatingardagur: | Føðingardagur: | Seinasti innlatingardagur: |
|---|---|---|---|
| 1/1 – 28/2 | 1. apríl 2005 | 1/7 – 31/8 | 1. juli 2005 |
| 1/3 – 30/4 | 1. mai 2005 | 1/9 – 31/12 | 15. august 2005 |
| 1/5 – 30/6 | 1. juni 2005 | | |

Hava báðir hjúnafelagarnir skyldu at føra roknskap, kunnu báðir lata inn sambært tí freist, sum er galdandi fyri tann hjúnafelagan, sum hevur tann seinna føðingardagin.

### Umsókn um longda freist

Freistin verður bara longd, um serlig orsøk er til tess, t.d. sjúka. Skrivlig umsókn skal latast Toll- og Skattstovuni. Freistin verður givin eftir avtalu í styttri tíð í senn, men kann tó ikki verða givin longur enn til 15. august 2005.

Tá biðið verður um longda freist, skal hetta vera gjørt fyri hvønn persón sær, og harafturat verður kravt, at:

– umsóknin er latin inn, **áðrenn nevndu innlatingarfreistir eru farnar**
– sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir fyri eldri ár eru komin inn.

### Kapitalvinningssjálvuppgáva

Ein kapitalvinningssjálvuppgáva verður send saman við sjálvuppgávuni/skattauppgerðini. Sí nærri frágreiðing í bóklinginum 'Skattinum 2004'.

Kapitalvinningssjálvuppgávan skal latast inn við somu freistum, sum eru galdandi fyri vanligu sjálvuppgávuna.

Persónar skulu ikki lata kapitalvinningssjálvuppgávu inn, hava teir bert rentuinntøku frá føroyskum peningastovni ella postgiro, har skatturin er goldin.

Sjálvuppgávur, ognaruppgerðir og roknskapir eru roknað fyri at vera latin inn rættstundis, tá ið tey eru latin í postin, ella eru Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi teir innlatingardagar, sum eru nevndir omanfyri. Fellur seinasti innlatingardagurin á leygardag, sunnudag ella halgidag, verður seinasti innlatingardagur fyrstkomandi gerandisdag.

Er fullfíggjað sjálvuppgáva ikki latin inn rættstundis, hevur Toll- og Skattstovan heimild at meta inntøkuna og harafturat at áleggja sekt.

**sí eisini heimasíðu okkara: www.tollskatt.fo**

**19. januar 2005**

Toll- og Skattaráð Føroya

Vit hava útgerðina til trol- og nótaflotan



Flótitrol
Botntrol
Rækjutrol
Snurpunótir

VÓNIN
Høvuðsskrivstova:
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 444 246
Telefax 444 579
Tórshavn:
Viðarnes
100 Tórshavn
Telefon 354 391
Telefax 313 319
info@vonin.com - www.vonin.com

FF-blaðið
www.fiskimannafelag.fo

SKIPSTIMBUR & APTERING



Vit átaka okkum alt arbeiði innan skipstimbur og aptering, so sum nýggja messu, brúgv ella lugar.

Sp/f Skipstimbur og aptering
v/Jón Jacobsen · FO-470 Eiði · Tlf: 22 23 86

# Um fabrikkina og Valdemar Lützen

Í seinasta blað høvdu vit eina frásøgn frá samkomuni í sambandi við, at fyritøkan Valdemar Lützen byrjaði sítt virksemi fyri 100 árum síðani. Hesa ferð hava vit eina áhugaverda frásøgn um søguna hjá "fabrikkini" og um Valdemar sjálvan, sum var framúr bæði sum vinnulívsmaður og sum menniskja. Ein kelda til hesa frásøgn er Andreas Lava Olsen. Pápi hansara Johan arbeiddi hjá Valdemar í 57 ár, og abbi hansara Andreas í 63 ár, so hann er á heimabeiti her. Onnur kelda er Kim Lützen. Hetta er eitt áhugavert íkast til okkara vinnusøgu.

Vit hava eisini áhugaverdar myndir. Tær sum hava skrásetingarnummar eru frá Fornminnissavninum. Myndirnar frá konservesvirkinum eru "nýggjar", t.v.s. tær hava ikki verið kendar fyrr. Tað er so nógv av tilfari, at vit koma eisini at hava meira í komandi blaði.



*Valdemar saman við konuni Ellen, sum var úr Keypmannahavn. Børn teirra vóru Viggo, Mogens og Inga.*



*Mogens og Elin, sum er úr Fámjin.*

"Fabrikkin hjá Oestrøm" gjørdist ódeyðilig í yrkingini hjá Jóan Petur uppi í Trøð í Kvívík um hvussu keðiligt tað var á bygd og hvussu spennandi tað var í Havn.

Tað var eitt felag "The Normal Company, Limited" við høvuðssæti í Parlament Street nr. 53 í London, sum á vári 1886 søkir amtið um loyvi at byggja og reka eina verksmiðju í Rættará í Havn. Ætlanin var at tilvirka olju, lím, guano og matvørur av ymiskum slag úr fiski og fiskaavfalli.

Tá gekk gøtan (í dag Sigmundargøta) oman í Rættará framvið teimum trimum sethúsunum, sum tá vóru har omanfyri - hjá Jákup Lindenskov, Magdalenu á Høvdanum og Madam Midjord og oman móti strondini, har sethúsini hjá Lias í Rættará stóðu, og so niðan aftur fram við húsunum hjá Jákup Andrias Arge. Hesa gøtu høvdu teir ætlan um at broyta soleiðis, at hon gekk meira beint frá teimum trimum sethúsunum og beina leið oman fyri húsini hjá J.A.Arge.

Niðan fyri bygningin skuldi bryggja gerast, um 40-50 føtur long antin úr træi ella jarni. Í umsóknini biður felagið um loyvi til at víðka um bygningin, um tað skuldi gjørst neyðugt. Felagið vildi gera alt fyri ikki at vera til ampa fyri sjúkrahúsið, sum tá lá har sunnan fyri, ella býin Tórshavn sum heild. Bæði amtið og Tórshavnar kommuna góvu loyvi til at fara undir byggingina. Tað hevur gingið skjótt við byggingini, tí longu árið eftir er verksmiðjan í gongd. Arbeiðið var uppá akkord ella fastan prís. Grótið varð fingið úr Rættará. Tað skuldi kílast og borast og laðast. Teir sum bygdu fabrikkina, fingu 20 oyru fyri kvadratalinin, tá lá grótið í vegginum. Nógvir havnarmenn vóru við í hesum arbeiðinum. Kei verður gjørd framvið móti sjónum við einum pieri út frá til skip at leggja at.

Sethúsini hjá bátasmiðinum Liasi í Rættará stóðu har, sum fabrikkin kom at standa. Tey blivu tí flutt longur niðan, har tey stóðu oman fyri húsini hjá Hugo Øster.

Stjórin á fabrikkini var Karl Reinhold Østrøm, svenskur verkfrøðingur, sum flutti til Havnar við familjuni. Konan var úr New Zealandi. Sethúsini til útlendsku starvsfólkini vóru bygd í Rættará. Tey standa enn, tað eru tey húsini, sum Hugo Øster átti. Men høvuðsmaðurin aftan fyri fabrikkina var svenski ríkmaðurin Th. Nordenfeldt, kamarharri, sum búði í London. Umframt fabrikkina í Rættará hevði hann eina í Aberdeen og eina í Hebridunum.



*Her síggja vit pottin á konservesvirkinum.*

Teirra frítíðatítriv var hestar, og tey høvdu ein ríðibana úti á Rundingi, har Bacalao nú er.

Tá ið fabrikkin stóð liðug á sumri 1887, varð veitsla hildin jóansøkudag, og nógv fólk var komið saman. M.o. talaði amtmaðurin, sum tá var Buckwald.

Havnarfólk frøddust um hetta tá í tíðini stóra tiltak, sum kom at geva arbeiði til nógvar hendur. Fabrikkin tók ímóti fiski og slógvi v. m. Har varð framleitt guano, lím og medisinlýsi. Men tað vísti seg ikki at bera til fíggjarliga, helst kom ov lítið av rávøru, og longu í 1894 fór fabrikkin á húsagang.

### Lützenættin kemur inn í myndina

Jacob Lützen, keypmaður í Havn, keypti bygningin. Keypssáttmálin er undirskrivaður 28. mai 1894.

Jacob Lützen var sonur A.C.Lützen og Evu Margrethu úr Baiansstovu. Pápin A. C. Lützen, sum búði í skúlahúsunum úti á Reyni, hevði handil beint yvir av skúlahúsinum úti á Reyni, í einum húsum, sum Elduvíks-Jóannes átti. Seinni handlaði hann í Fútastovu fyri Jørgen Bech & Sønner. Jacob Lützen tók yvir handilin í Fútastovu. Hann handlaði eisini fyri Jørgen Bech & Sønner. Jacob Lützen bygdi við Tinghúsvegin 1876.

Ein systir Jacob Lützen var Anna Evensen, hvørs lívssøga hugtók okkara lesarar, tá vit prentaðu hana í 2003. Her varð eisini greitt frá teirri áhugaverdu søguni hjá A.C.Lützen frá tí hann óforvarað kemur til Føroyar, og til hann í 1874 sum borgmeistari doyr, meðan kongur, sum var komin á vitjan, heldur í hondina á honum. "Det var en skøn død" skrivar dóttirin.

### Stór framsýning í fabrikkini

Fríggjadagin 26. juli 1895 á middegi lat framsýning upp í fabrikkini, og fær hon stóra umrøðu í Føringatíðindini. Jacob Lützen var so beinasamur at hýsa framsýningina. Av tí at formaðurin, sýslumaðurin Müller, var sjúkur, bleiv inngangstalan hildin av næstformanninum Júst Jacobsen. Hann bað øll, sum komin vóru og sum koma skuldu til framsýningina, at vera vælkomin og ynskti teimum bæði gagn og stuttleika. Og so varð eisini rópt níggjufalt hurrá fyri kongi.

Nógvir lutir vóru komnir til hesa fyrstu framsýning bæði úr Føroyum og eisini úr útlondum. Kvinnuverkini tóktust at vera við yvirlutan í nøgd, og mong av teimum frálík til dygdar og vakurleika. Nógvir sera góðir vovnir lutir í føroyskum og útlendskum mynstri, hartil vøkur teppir og vaðmal vóru á framsýningini. Av bundnum vóru nógvar troyggjur bæði fínar og grovar og fínt bundin turrriklæðir. Av baldýraðum og heklaðum lutum og seymaðum var eisini væl at síggja. Tikið var til fínspunagarn úr Vágum. Eisini vóru skinnteppir og alúneraði skinn. Av træarbeiði var lítið at síggja, tó ikki sørt av útskornum arbeiði, ein grein, sum hildið varð, at ov lítið varð lagdur dentur á her á landi.

Av steinarbeiði mugu vit fyrst og fremst nevna skírnarskál (doypifuntur) úr Kunoy.

Tað má sigast, at fólk hevur dugað á at skyna, at hetta virkið kann hava nógv at týða fyri okkum, annars hevði ikki so nógv fólk komið til sýningina.



*Hetta hevur verið ein partur av framleiðslugongdini.*



*Og nú eru blikkini komin á borðið.*

Mesta fólkið var sunnudagin. Tá loystu nærum 1.000 sær atgongumerki. Tilsamans sóðu 2.400 fólk sýningina. Tað má sigast at síðan kongur var í 1874, hevur ikki so nógv fólk verið í Havn, um tað ikki var meir hesu ferð.

### Konservesvirksemi

Jacob Lützen fór undir konservesvirksemi. Sonurin Valdemar var í Bergen fyri at seta seg inn í konservesframleiðslu, og tað var hann, sum kom at standa fyri hesum. Men aftaná fyrra veraldarbardaga, var ein støðgur. Tá legði Danmark toll á konserves. Seinni kom gongd á aftur og arbeitt varð við bæði lunda og lomvigabringum og eisini haru í dós.

Og væl var vøran umtókt. Í 1909 fekk hon fyrstu virðisløn og diplom á stórari framsýning í Århus.

Á fabrikkini vóru maskinur til at gera blikkini. Tá ið teir fyri nøkrum árum síðani gjørdu ymsar broytingar, funnu teir ein kassa av plátum til blikk. Fabrikkin gekk til 1939. Undir krígnum varð einki gjørt við konservesframleiðslu, tí einki tilfar fekst. Maskinurnar stóðu til aftaná kríggið, tá tær vóru seldar.

### Spinnarí og spreingievni

Johan Evensen byrjaði sítt spunavirki í fabrikkini. Hann var sonur Onnu Evensen, sum er væl kend av okkara lesarum, og sum var fastur Valdemar. Tískil var Johan systkinabarn Valdemar. Í kjallaranum var ein brunnur, har vask og liting fóru fram. Seinni flutti "Spinnarin" virkið hjá sær út til Sandá, har tað enn sæst. Søguna hjá honum hava vit eisini havt her í blaðnum.

Her kann eisini verða nevnt, at Jacob Lützen, pápi Valdemar, keypti eitt øki norðan fyri fabrikkina frá verpápanum M.C.Restorff. Her varð gjørt eitt neyst til spreingievni, sum teir seldu. Har vóru tveir brunnar til at leska kálk í. Alla tíðina skuldi rørast í kálkinum fyri at tað ikki skuldi stadna.

### Valdemar byrjar á jólum 1904

Í 1904 søkir Valdemar um at fáa handilsloyvi. Jólaaftan sama ár byrjar hann at selja m.a. "kul, koks og brænde samt byggematerialer". Hann fær sáttmála at lata vørur til Færøernes Fyrvæsen og donsku sjóverjuna. Hann keypti skonnartina "Olaus", sum var komin inn á Skálafjørðin fullfermd við koli. Men skipið hevði eisini leka. Valdemar leigar eitt øki inni á Strondum, og hann nýtir "Olaus" sum hulk. Tað er frá hesum, at staðarnavnið Hulkur stavar. Í 1934 byggir hann oljutanga á Hulki, og her selur hann vatn til skip, kol og olju. Og hetta virksemi hevur hann til seinni heimsbardagi brestir á. Valdemar var yvirhøvur væl lýddur sum ein góður arbeiðsgevari. Á Strondum varð hann kendur fyri at gjalda lønina í hondina. Hetta var ikki nøkur sjálvfylgja á bygd tá í tíðini.

Valdemar hevði sera fjølbroytt virksemi. Í 1930 varð sandbáturin "Slúkur" keyptur, og Valdemar og Niels í Heiðunum seldu sand saman. Valdemar fekk sær eisini roykivirki, har teir royktu sild og ál.

Eisini átti hann skip. Fyrst "Forældres Minde" og síðan "Syv Søstre", har vit í 2004 høvdu eina frásøgn um eina buldrasliga ferð til Skotlands, har presturin Absalon Joensen var við á ferð síni til Jorsala.

Valdemar var eisini ein av undangongumonnunum í mjólkaforsýningini, sum útvegaði havnafólki mjólk og regluligt ferðasamband til stóran part av landinum. Hetta var stórt frambrot tá í tíðini. Mjólkaforsýningin fór eisini at framleiða margarin. Seinni kom sápufabrikkin "Okkara" afturat.

Valdemar var eisini í mong ár umboð fyri eitt enskt tryggingarfelag, har stórur partur av føroyskum sethúsum vórðu tryggjað.

Hann var eisini oddamaður hjá arbeiðsgevarum, tá arbeiðararørslan tók seg upp. Hann var við til at gera fyrsta sáttmálan við Havnar Arbeiðsmannafelag í 1916 og varð hetta gjørt uttan verkfall.

Valdemar var eisini borgmeistari eitt skeið.

Hann var eisini kirkjuverji og var kendur fyri sítt sosiala medvit.

### Skeiva pakkhús

Í 1928 lat Valdemar Skeivapakkhús byggja. Grótarbeiðið við Skeivapakkhús stóð skrivarin Jens Jensen fyri saman við Essa á Kirkjuveg, pápi Giggu, Sandru og Óla hjá Essa, ið eisini arbeiddi saman við pápanum. Óli var eisini tiltikin at arbeiða við jarni. Valdemar fekk gjørt eina lítla smiðju uppi á Høgukaj skamt frá trappuni niður á Lágu-kaj. Timburarbeiðið høvdu Frants & Óli Mortensen av Argjum. Valdemar kravdi at eitt stórt hurðahol bleiv gjørt í kjallaranum á suðursíðuni, men skrivarin noktaði. Valdemar fekk hann at gera tað, við at taka skyldina á seg – Skrivarin segði tað var óðamannaverk. Hurðaholið bleiv so múrað til, men fleiri ár seinni tikið frá aftur, og hurð sett í, so teir stóru lastbilarnir kundu fáast innar. Sig so ikki at Valdemar var framsíggin.

Skeiva pakkhús er í dag goymsla hjá Lützens Timburhandil.

### Sethúsini hjá Valdemar

Sethúsini vóru bygd aftaná at amtslæknahúsini vóru liðug í 1927. Tórshavnar Kommuna vildi síggja til, at amtslæknin ikki misti útsýni á vánna. Grótarbeiðið hevði Magnus A. Samuelsen (Magnus hjá Lisabeth) beiggi Wilhelm Tórsheim. Um hann gjørdi grundina veit eg ikki, men garðin kring húsini og stabbasteinarnar við grindina, sum eru sjaldsama vakrir, gjørdi hann. Seinni flutti Mogens við húski inn her.

### Ísvirkið

Undir øllum krígnum var ísvirkið í bygninginum, og tað var tað einasta, sum var í Havn tá. Teir lótu ís til ísfiskabátarnar. Tað bleiv arbeitt alt samdøgrið. Hetta var eitt sjálvstøðugt felag – Ís og konserves. Fiskacentralurin kom síðst í 1940-unum. Teir kundu koyra ísin beinleiðis umborð á skipini, meðan tað her skuldi koyrast við bili til skipini. So tað bleiv ov dýrt, tí varð givist við at framleiða ís á fabrikkini, eftir at Fiskacentralurin kom. Tá í tíðini vóru ongar frystiboksir sum í dag, so frystigoymslurnar á fabrikkini vóru nógv nýttar av havnarfólki at goyma kjøt og annað í og helt hetta fram til í 50-unum.

Tá komu eisini deksbátar við tvøsti frá hvalastøðini við Áir. Tað varð fryst á fabrikkini, helst til minkafóður.



*Her síggja vit gamla útgerð frá konservesvirkinum saman við diplominum sum fekst á framsýningini í 1909. Eisini síggja vit tær etikettur, sum vórðu á blikkunum. Hetta kundi ikki verið gjørt meira professionelt í dag.*



*Hendan myndin vísir virksemið í dag, sum Valdemar Lützen legði grundina til. Skeivapakkhús er næsti granni hjá Müllers pakkhúsi.*

*Framhald á næstu síðu*



*Fabrikkin sum hon sá út í 1927.*



*Kolabrúgvin. Hon stóð bert uppi um summarið.*

Bretska hervaldið tekur bygningin

Bretska hervaldið helt til í parti av fabrikkini undir seinasta veraldarbardaga. Har høvdu teir stóra goymslu av mati í blikkum og frystivørum. Eisini klæðir og militerskógvar. Nógv av teimum tómu blikkunum komu aftur, har tey vóru bankaði fløt og koyrd í tunnur, og send aftur til Onglands, har tey blivu brædd og gjørd til kúlur og annað. Valdemar var annars bæði bretskur og franskur konsul.

Dampdrivin maskina

Tann fyrsta maskinan, ið var dampdrivin, var um 50 hestar. Hon dreiv kompressarar, valsir og kvørnir og annað mangt á Fabrikkini. Motorurin bleiv skiftur út við motorin á gamla Meiaríbátinum Tróndi. Seinni fekst dieselmotorur.

Av áhuga kann vera, at fyri at økja um drívmegina hjá dampmaskinuni varð eitt øki keypt norðanfyri Rættará, har ein brunnur varð bygdur, og vatnið higani kom at hjálpa til at dríva maskinuna.

"Kul, koks og brænde"

Valdemar Lützen handlaði við byggitilfari og timbri. Timbrinum gavst hann við síðst í 1920-unum. Men byggitilfari, jarni, cementi, múrsteinum og øðrum helt hann fram við, og eisini kolinum, koksinum og brenninum. Í 1959 fór fyritøkan tó aftur at selja timbur.

Eina tíð keypti Valdemar eisini torv úr Rituvík at selja havnafólki. Í 1920-unum varð koyrt runt í býnum við hestavogni við vøru. Tá byrjaði bilar at koma, og so við og við keypti Valdemar teir kendu gulu lastbilarnar, sum høvdu nr. 16 og 32.

Í Vágsbotni móti Bryggjubakka stóðu neyst og lág trægoymsluhús hjá Vágsbotnshandlinum. Í fyrru helvt av 1920-unum vóru hesi hús tikin niður, og betongbygningar stoyptir. Valdemar Lützen átti tann norðasta av teimum. Hann hevði verið í Bergen, og hann mælti til, at bygningarnir fingu sama snið, sum Hansabygningarnir á Tyskerbryggen í Bergen. Tað er eisini her at fiskimannafelagið húsast. Skrivstovan hjá Valdemar Lützen var øll árini úti í Fabrikkini í Rættará, men tá ið bygningurin á Bryggjubakka var liðugur í 1923-24, var flutt higar. Men so flutti hann útaftur í mars 1940 í nýggja skrivstovubygningin, ið bygdur bleiv sunnanfyri Fabrikkina og yvir Rættará. Konsul Mason hevði eisini skrivstovu í Rættará undir krígnum. Har komu tí nógvar skipsmanningar at stempla passini hjá konsul Mason.

Mogens keypti Heinesens handil í 1952-53, har hann byrjaði handil við køksbúnyttum og seinni amboðum.

Valdemar Lützen hevur verið eitt gott arbeiðspláss, og sum áður greitt frá hava fólk arbeitt her leingi. Fleiri hava arbeitt her heilt upp til 50-60 ár.

Eisini olja

Tað hevur helst verið í 1930-unum, at Valdemar Lützen yvirtók DDPA-agenturið. Men tá ið kríggið brast á, var eingin leverandørur úr Danmark. Tá sendi Valdemar eitt telegramm yvir til Rockerfeller í New York. Hann svaraði aftur og spurdi hvør handlaði við olju. Hann fekk at vita, at tað var Shell og DDPA. Ja, um vit kundu vera samdir, var einki í vegin. Eingin trygging var, so Valdemar Lützen tók ábyrgdina bæði fyri Shell og DDPA. Ein oljubátur Tuxhavn sigldi undir øllum krígnum úr Onglandi við petroleum, bensini og olju til bæði Shell og DDPA.

"Oljuævintýrið", sum kundi verið ein longri søga, endaði í 1949, tá Esso sjálvt, seinni Statoil, yvirtók oljuna.

Eisini bakarí, bomm og rabarbur

Eina tíð var bakarí í fabrikkini. Andrias í Horni, sum hevði lært til bakara hjá Restorff á Áarvegnum, bakaði har eina tíð, áðrenn hann sjálvur bygdi sethús og bakarí í Bø, núverandi Bøgøtu. Eisini Knud Lambaa hevði heilsølu og agentur í norðasta partinum oman móti Vestaruvág. Lúka bleiv sett í múrin oman móti brúnni, so vørurnar kundu fáast inn og út tann vegin.

Jens Simonsen vanliga nevndur Gøtu Jens, fór saman við Knút Lützen, beiggja Valdemar, í holt við at gera bomm á fabrikkini. Hetta man hava verið umleið 1920. Knút fekk helvtina av fabrikkini í sín part, meðan Valdemar fekk hina helvtina eftir pápan Jacob Lützen. Knút Lützen sigldi sum ungur; eina tíð hevði hann DDPA olju-agenturið. Harald Haraldsen á Trappuni hevði haft tað frammanundan.

Eina tíð aftaná kríggið gjørdu teir rabarbusúltutoy á fabrikkini; har stóðu nógv konufólk og skóru. Ein stórur pottur var og sukur varð nógv brúkt. Hettar arbeiði vardi í nøkur ár.

Mogens Lützen tekur við

Tað kom at gerast sonurin Mogens, sum kom at dríva fyritøkuna víðari aftaná Valdemar, tá hann doyði í 1957, 79 ára gamal.

Hann fekk útbúgving í Danmark og starvaðist har, inntil hann fyrst í 30-unum fekk boð um at koma heim aftur. Tá vóru tíðirnar ringar í Føroyum, so hetta hevur kravt sín mann.

Tá fóru tey eisini undir sølu av olju, bensini og petroleum, sum varð selt til skip og húsarhald kring landið.

Tá heimsbardagin brast á, gjørdist Mogens saman við Brockie enskur varakonsul, og teir vóru "vara" hjá pápanum Valdemar og Mason, sum vóru konslar. Mason kom úr Bretlandi og hevði skrivstovu hjá Valdemar Lützen. Tað er óneyðugt at siga, at hetta hava verið týdningarmiklir sessir undir bretsku hersetingini, tá tað hava verið hópin av stórum og smærri málum, sum skuldu loysast.

Mogens sigldi undir krígnum fleiri túrar til Onglands við tangabátum, sum sigldu til Føroyar. Hesar ferðir gjørdi hann í handilsørindum.

Tað kann verða nevnt, at hesir fýra, sum røktu konslastarvið, vóru samdir um, at føroyska flaggið skuldi góðkennast, og sendu teir fjarrit til London við hesum boðum. Hetta hevur havt sína vekt og er eisini ein partur av okkara flaggsøgu.

Seinni gjørdist Mogens franskur konsul. Hetta starv hevur verið í ættini í fýra ættarlið.

Mogens var eisini í eini 25 ár fram til 1980 nevndarlimur í Føroya Banka. Her var hann kendur sum ein skilamaður, og sigast kann við vissu, at tað var ikki eftir hansara uppskrift, at tað seinni gekk, sum tað gekk við bankanum.

Mogens var í nógv ár virkin limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag, og í jubileumsbókini hjá hesum feløgum "Semjur og Stríð" hjá Jógvani Arge fær Mogens tað skoðsmál, at hann hevur verið ein "trúfastur limur". Sagt verður eisini um hann sum stjóra fyri p/f Valdemar Lützen, at hann "hevur havt gott eyga fyri nær tíðin til útbyggingar var komin, og nær stundin var at ansa sær og tað væl."

Mogens og konan er bæði fødd í 1909, so tey eru við at eldast. Tey hava verið gift í ikki minni enn 72 og eitt hálvt ár, og man hetta vera nærum met. Á hesum økinum hevur heldur ikki verið nakar slingur í valsinum.

Vit senda teimum eina heilsan.



*Kolalossing. Hon var í hvussu er arbeiðsskapandi.*

# Skaðagrindin í Sandvík í 1915

13. februar í ár er sunnudagur og henda dag eru liðin 90 ár síðan fjúrtan mans lótu lív í Skaðagrindini í Sandvík í 1915. Hóast 90 ár eru runnin, so stendur hesin dagur enn, sum ein tann mest ógvisligi feigdardagurin í Føroya søgu. Hóast nógv er sagt og skrivað um hesa vanlukku, í nú brátt 90 ár, so tikist hendingin kortini mongum – enn sum áður – at vera torfør rættiliga at fata.

**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum**

### Torført at fata

Í brævi, sum hvalbingurin Petur í Køkini skrivar 14. februar 1915 (dagin eftir vanlukkuna) sigur hann m.a. frá, hvussu torført tað var at skilja tað, sum hendi í Skaðagrindini í Sandvík. Hann byrjar brævið við hesum orðum: *Det er med megen sorg, at jeg skriver dig disse linjer. Vi har i går mistet vor dejlige søn (Niels Peter Joensen) i en grindedræbning i Sandvík. Der var så megen brænding, at to både kæntrede, 9 mand i den ene og 6 i den anden.*

### Misti bróður og son

*Jeg selv var med og den eneste, som blev reddet. Det kan jeg ikke selv forstå, hvordan det gik til, at jeg blev reddet.*

*Jeg var flere gange løs fra båden og langt nede, men fik stadig fat i ham igen.*

*Efter længere tid kom en båd mig til hjælp.*

*Du må ikke tro, at jeg var bare glad for at blive reddet. Det var kun for Marianes (kona hansara) og døtrenes (Kristianna og Johanna) skyld.*

*Min broder Hans døde også.*

*I alt 14 unge mænd og drenge som Peter. Det er en utænkelig sorg, både ude, hvor han plejer at arbejde og ikki mindst hjemme.*

### Dagurin byrjar

Í 1965 skrivaði Martin Holm, blaðgrein um Skaðagrindina og tær fylgjur, sum hendingin fekk. Martin sigur m.a. soleiðis frá:

Hetta var leygardagur í føstuinngangi, hin 13. februar 1915.



***Petur í Køkini:*** *f.17/5-1871 – d.27/3-1934. Niels Peter Joensen (vanliga nevndur Petur í Køkini) var sonur Niels Petur í Stórustovu (f. 2/10-1834 – d. í mars 1874 við skjútsbáti millum Hvalba og Skúvoy).*

*Mamma Petur var Annika Lisberg (f. 30/11-1865 – d. 15/9-1912). Petur í Køkini var giftur við Mariane Kristine Mortensen, Úti í Garði, Øravík. (f. 9/1-1872 – d.13/4-1951).*



***Hans Pauli Holm:*** *f. 13/2-1885 – d. 13/2-1915 í Skaðagrindini 30 ára gamal, ógiftur.*

*Hans Pauli var sonur Onnu Kathrinu Lisberg (Anniku) og Niels Olaus Holm, vanliga nevndur Lávus í Køkini (f. 15/2-1851 – d. 1940). Tey giftust 1/11-1877.*

Vindur var eingin at hoyra, men so mikið harðari bresti lógvin. Tá dagslýsið spakuliga kreyp upp á luftina, sást landsynningsbrimið stíga væl upp í bergið báðu megin fjørðin.

Við degnum komu hvítar skjúrtur út á fleiri snórar.

Í Hvalba hevði leingi verið siður at halda mánadagin í føstuinngangi. Tá var eikitunna væl bandað, og hongd upp í gálga í lága bønum. Í hvítum skjúrtum skipaðu menn seg í víðan ring kring tunnuna, og hildu sær á gleimi. Soleiðis skuldi eisini verða mánadagin 15. – teir skuldu sláa tunnu.

### Grindaboð úr Sandvík

Tíðliga fyrrapartin komu grindaboð úr Sandvík, og rópið varð loftað býling úr býlingi. Menn mettu líkindini soleiðis, at um bátur flotaðist á Mølini, so torgaði hann ikki um Mjóvanes.

Menn fóru væl mannaðir til gongu úr Hvalba til Sandvíkar.

Meðan teir vestaru menninir tóku seg upp uttanvert í Sjeaklett, sóust teir uttaru taka seg niðan frá Knarrarvørru. Hart varð gingið niðan Heiðar. Komnir á Sandvíksegg sóu teir Ásmundarstakk vaða í brimi og Sandvíkslógv bróta krappa. Og har, mitt á kjøkrutu víkini lógu umleið 5 bátar við grindini. Nú vóru ikki stundir at lata møðina renna, og skjótt halaðu teir oman brattan, løgdu hvønn annan eftir tvørtur um sandin og bøin – út í støðna, riptu skorðarnar undan bátunum, passaðu sær løgir og flotaðu saman við sandvíkingum. Soleiðis sigur Martin Holm frá í blaðgrein síni.

### Tá roynt var at halda grindina til

Landsynningsaldan var síð á Sandvíkini henda dagin, men roynt var at halda grindini til við 8 bátum.

Í fyrstu royndini komu 30-40 hvalir upp á land. Men nú kom grindin sær út um bátarnar.

Væl av fólki, grindamonnum, konufólki og børnum eygleiddu teir 8 bátarnar, ið royndu at fáa grindina inn ímóti aftur.

### Ógvuslig grunnbrot

Tá løgir vóru – varð stungið, og tað eydnaðist at fáa væl av hvalum upp á sandin.

Men nú tóku ógvuslig ólógi seg upp. Tað breyt tvørtur um alla Sandvíkina. 5 bátar vóru tá staddir uttanfyri og 3 innanfyri ólógini.

Tveir bátar komu í sjálva holingina, t.e. stór kulla í meldurstreymi.

Bátarnir lógu stavnrætt ímóti, men grunnbrotini vóru so brøtt, at teir fóru eftir endanum, fyltust og holvdust.



***Niels Peter Joensen, yngri:*** *F. 12/5-1898. Niels Petur, sonur Petur í Køkini og Mariane Kristine Mortensen, sum doyði í Skaðagrindini 16 ára gamal.*



*Petur í Køkini og Tummas Thomsen. Petur var eisini handilsmaður. Hann handlaði fyri Thomsen á Tvøroyri. Á myndini er hann í grindabáti saman við Tummas Thomsen, teir vóru vinmenn.*

Tann triði báturin var nakað innari, og kom ikki í holingina. Hesin báturin bjargaði sær út um brotini í øllum góðum.

### Tað mól at grunni og frá grunni

Men nú var bara hugsað um at bjarga teimum, sum verið høvdu í teimum tveimum bátunum, sum vóru hálvdir.

Men tað var lættari sagt enn gjørt.

Tað mól alt at grunni og frá grunni, – hjá teimum sum komu undir fyltust eygu, oyru og munnur við sandi.


Det er med Megen sorg at
jeg skriver Dig disse Linjer, vi
har i gaar mistet vor Dejlige Søn
i en Grindedræbning i Sandvig der
var saa megen Brænding at to
baade kentrede 9 Mand i den ene
og 6 i den anden, jeg selv var med
og var den eneste som blev reddet

*Framhald á næstu síðu*

### Tveir á kjøli

Hetta var ótespilig sjón.

Tveir bátar lógu brádliga holvdir, og ein maður sást á hvørjum kjølinum. Tann eini var Júst Hammer úr Hvalba.

Menn, teirra millum Mortan á Fløttinum úr Hvalba og Carl á Brúgv úr Trongisvági, gjørdu seg til reiðar at svimja út eftir honum. Men so var hann skolaður av kjølinum, og drigin at botni í tí herviliga meldrinum. Júst Hammer spurdist ikki aftur.

Enn sat Petur í Køkini á hinum kjølinum. Hvørja ferð brotini løgdu inn yvir hann, legði hann seg flatan heilt frammi um kjósina á bátinum. Tá av fjaraði sást hann krøkja seg fastan í róðurjørnini. Fleiri ferðir ók hann fram eftir kjølinum til reiðar at taka næsta brotið.

### Tvær royndir at bjarga Peturi

Brádliga sást bátur koma snórabeinur við stórari ferð. Hann rann í brotinum inn á lónna. Tað sást, at nú var ein roynd gjørd at bjarga Petur í Køkini, sum enn sat á kjøli. Báturin streyk tætt fram við honum, men ikki eydnaðist at fáa fatur í mannin. Báturin rann líka upp á turt á sandinum.

Hóast fyrsta royndin miseydnaðist mistu teir ikki móti, teir hálvdu sjógvin úr bátinum og løgdu til brots aftur. Og nú eydnaðist at bjarga Peturi.

### Bjargingarbragd

Teir menn, sum her sýndu mót og mans hjarta vóru: Jákup á Hólum, Mikkjal undir Heygnum, Bóndin uttan Ánna (Joen J. Olsen), Rasmus á Stykkinum, Dánjal á Hólum, Hans hjá Hanusi, Tummas Kvilt, allir úr Sandvík. Afturat teimum vóru Niels á Bakkanum og Jóhan í Giljum, báðir úr Hvalba.

Sonur Petur í Køkini (Niels Peter Joensen) var á báti saman við pápanum. Tá hesin bátur seinni var fingin upp á land, vísti tað seg, at sonurin var vorðin fastur í einum enda, sum var festur í bátin, og kom soleiðis druknaður upp á land.

Grindin var stór, 218 hvalir løgdu beinini, men nógv gekk eftir bæði tann dagin og dagin eftir.

### 8 ungir menn undir børu

Tá mánadagurin, 15. februar kom við kulda og vátaslettingi av norðri, stóðu 8 ungir menn undir børu, og 6 av bátsfeløgunum teirra rókust í havinum. 14 mans sjólótust í Skaðagrindini.

Nógvir av teimum sum umkomust vóru frálíkir svimjarar. Ein teirra var bróður Petur í Køkini, Hans Pauli Holm.

### Bræv skrivað 21. februar

Petur í Køkini skrivaði 21. februar eitt hjartaligt bræv til systir konu sína, Helenu, sum búði í Danmark. Hann skrivar m.a. soleiðis:

*I går blev vor søn begravet tillige med 5 andre unge mænd og drenge.*

*Det var et sørgeligt ligtog, der var en stor masse mennesker alle steder fra.*

*Min broder Hans blev begravet med vor søn, på højre side, og vor søstersøn Niels Pauli på venstre side, alle i en grav.*

*De tre andre blev begravet hos deres familie, deriblandt var din kusines Susanne Malenes ældste søn, 14 år.*

*Der er endnu 6 lig som ikke er komne tilbage endnu.*

### Stór sorg men eisini troyst

*Som du tiltænke dig så sørge vi meget. Især lider Mariane meget (tað er kona hansara). Jeg selv savner vor søn meget.*

*Men der er også ting som jeg glæder mig over, for jeg kender en del til verden og dens besværligheder. Ikke at tale om dens fristelser.*

*Disse er han befriet for, hvilket er en stor fordel.*

*Døden har han også overvundet på en forholdsvis let måde og saligheden er ikke at betvivle.*

*Til denne dag har vi bare haft glæde af ham, for han var en sjælden god og lydig søn.*

*Hver eneste aften når vi var gået i seng før end han, kom han at kysse os god nat.*

### 5 gjørdust einkir

25. februar skrivar Petur í Køkini soleiðis: *Der er endnu ikke flere lig komne tilbage så der komme vist ikke flere.*

*Ved den ulykke blev der 5 enker og det var alt så unge mennesker, at ingen havde mere end et barn, dog med undtagelse af den ene, så de er ikke ilde stillede med udkomme, for det var duelige mænd.*

*Kære svigerinde, vi glemme aldrig vor kære søn, for han kan ikke glemmes. Man skulde aldrig se at han plagede nogen der var svagere. Han var på den måde, at om Gud havde givet mig midler i hænde selv at skabe ham, så havde han ikke været mere efter mit ønske.*

*Han var i besiddelse af alle de egenskaber som jeg satte pris på og som jeg havde tiltænkt ham at have brug for, men nu har han ikke brug for noget af den slags.*

### Teir ið umkomust í Skaðagrindini

Úr Sandvík: Joen Jacob Frederik Petersen, 26 ár. Elias Petersen, 20 ár. Jacob Danielsen, 22 ár. Niels Pauli Olsen.

Úr Hvalba: Hans Pauli Holm, 30 ár. Jens Pauli Midjord, 27 ár. Just Alexander Hammer, 27 ár. Christian Fredrik Sofus Joensen. Jens Pauli Niclasen, 22 ár. Daniel Pauli Holm, 27 ár. Niels Peter Joensen, 16 ár. Michel Nattestad Nordberg, 16 ár. Johannes Andreas Hammer, 17 ár. Ole Michael Nielsen, 14 ár.

### Minnisvarði

Á Sandvíksegg er útsýnið frítt í allar ættir. Valla nakra aðra staðni í oyggjunum er land og hav meira áríniligt ella kvæmt fyri veðri og vindi. Her reisti sóknin teimum, ið umkomust í Skaðagrindini minnisvarða.

Í 1958 var hesin minnisvarði so illa slitin av vindi og veðri, at tey avvarðandi fluttu hann av eggini og reistu hann av nýggjum í Sandvík.




*Minnisvarðin, sum varð reistur í Sandvík, til minnis um teir, ið fórust í Skaðagrindini.*



*Samanbering við tekningina niðanfyri. Tey trý húsini uttast frá vinstru eru: (10) Hjá Kristian á Bakkanum, (9) Vestan Tún, (8) Stórustova (tey stóru húsini við kvisti). Svørtu húsini við hvítari grund, høgrumegin, er Nýggjustova (5).*




*1) Kirkjan, 2) Uppi í Skálum, hjá Petur í Køkini, 3) Handilin hjá Petur í Køkini, 4) Hjá Lávus Holm í Køkini, 5) Nýggjustova, 6) Uppi í Garði ,7) Hjá Elsebeth Helenu Skaalum, 8) Stórustova, 9) Vestan Tún, 10) Hjá Kristian á Bakkanum*

## Bakkhúsbáturin

22. mars 1874 fóru 9 mans skútsferð úr Hvalba til Skúvoyar.

Einki frættist aftur um manningina.

Í Hovedministerialbogen fyri Suðuroyar Prestagjald, er hetta skrivað um tilburðin:

22. mars 1874 antages følgende 9 mand at være forulykkede pr. Skyds på Hjemvejen fra Skuø til Hvalbø.

Baaden fandtes ilanddreven, knudst i Skopen, og en kasse med et Kompas og Klæder tilhørende Morten Næs fandtes ilanddreven ved Vigerbirge.

1. Ole Willumsen, Husmand i Hvalbø, født i Vaag, 32 Aar, gift.
2. **Niels Peter Joensen,** Odelsmand i Hvalbø, f. 2/10-1834 gift 30/11-1865 Anna Kathrina Lisberg.
   **(Viðmerking: Anna Kathrina var vanliga nevnd Annika, og giftist uppaftur 1/11-1877 við Olaus Holm (Lávus í Køkini).**
3. Jacob Berg, Husmand i Hvalbø 33½ år, gift.
4. Joen Bærendsen, Husmand i Hvalbø 33½ år, gift.
5. Daniel Pauli Holm, Husmand i Hvalbø 23 år, enkemand
6. Morten Jespersen, Tjener i Giljum, Hvalbø, født i Ørdevig 23 år, ugift.
7. Hans Hansen, Tjener i Skaalum. Handelsmand Joen Hansen Søn, født i Hvalbø, Næs, 21½ år, ugift.
8. Poul Johannes Mørck. Husmand, Morten Mortensens Søn i Hvalbø, Næs, 23½ år.
9. Morten Næs, Handelsmand, Poul Mortensen Søn i Hvalbø, Næs, 22 år, ugift.

Framhald á síðu 15

# "Ran" farin fyrsta túrin



Tað er hugaligt, nú so nógv mistreysti er í landinum, at tað eru menn, sum vilja bróta upp úr nýggjum og hava mót uppá, at okkurt skal kunna bera til.

*"Ran" klárur at fara avstað.*



*Dánjal Johan við soninum John Mikkjal, sum eisini skal sigla við, men sum tó ikki verður við hendan túrin. Dánjal Johan skal við og allir tríggir synirnir fara at sigla við "Ran". Dánjal Johan eigur eisini tvær døtrar, sum báðar eru giftar við sjómonnum. Dallahan man vera ein av okkara royndastu trolaramonnum, so longu við honum hava teir á "Ran" fingið fyrsta góða fongin!*

Herfyri frættist, at nakrir ungir menn høvdu keypt "Ljósafelli" frá Mortani Johannesen. Millum hesar er tann bert 30 ára gamli Heri Godtfred og hansara brøður. Heri hevur seinastu árini verið skipari á "Roc Amadour", og hevur tað gingið stak væl. Teir hava eisini fiskað eftir búrfiski, og hetta hevur roynst so væl, at teir hava fingið hug til at fáa sær størri og betri skip við teimum øktu møguleikum, sum hetta inniber.

Annars er tað áhugavert at síggja enn eina ferð, hvussu fiskieydna kann fara í arv. Pápi Hera, Dánjal Johan Godtfred, hevur verið ein framúr fiskimaður sum skipari. Pápi Dánjal Johan, Mikkjal Godtfred, var stjóri á fyritøkuni hjá Dias á Heyggi í Vági og beiggi Mikkjal, Andrew Godtfred, var eisini ein góður skipari, sum greitt varð frá í frásagnunum hjá honum her í blaðnum seinasta summar. Her varð eisini greitt frá um pápan Dias á Heyggi, sum var ein framúr rokskipari. Dias var langabbi Hera Godtfred.

"Ljósafelli" er eitt søguligt skip sum hekkutrolari. Hann er tó ikki fyrsti hekkutrolarin í Føroyum. Tað var "Kap Farvel", sum varð keyptur brúktur til Vestmanna í 1966. Men "Ljósafelli" er fyrsti hekkutrolarin, sum er nýbygdur til Føroyar. Hetta var í 1971, og var tað Kjølbro fyritøkan, sum tá fór undir at byggja hekkutrolarar sum avloysarar fyri gomlu síðutrolararnar. Tann fyrsti var "Sjúrð-



*Jákup Olsen, fyrrverandi reiðari og tingmaður var eisini umborð. Her sæst hann saman við Jákup Godtfred, sum eisini skal við.*



*Her eru teir við at mynstra. T.h. skiparin Heri Godtfred saman við tí 17 ára gamla Aron Berg, sum er yngsti maður umborð.*

*Framhald á næstu síðu*



*Egil Mortensen hevur siglt við línuskipi alt sítt vaksna lív. Nú fer hann at royna trol!*



*Í hurðini er Even Vestergaard, sum hevur siglt við norðmonnum í nógv ár. Nú fer hann at royna seg á føroyskum kjøli. Næstur er Bergur Olsen, sum hevur royndir frá fiskiveiðu í New Zealandi. Síðani er tað Tórhallur Thomsen. Uttast til høgru er Áki í Skemmun i. Hann hevur verið heilsølumaður í Runavík í eitt mannaminni. Nú fer hann at royna seg sum kokkur!*

arberg". Mortan Johannesen ella Mortan hjá Kaj keypti trolaran í 1979 og var hann tann fyrra "Enniberg". Síðani fekk hann navnið "Antuut" og til seinast "Ljósafelli".

Og nú hevur hann so aftur skift navn til "Ran", og er farin til fiskiskap eftir at hava fingið neyðug eftirlit. Vit vóru umborð, tá teir mynstraðu tann 19. januar, og vit fingu eitt prát við skiparan og aðrar av manningini, sum tilsamans telur 20 mans. Allir vóru sera spentir uppá at sleppa at royna seg.

"Ran" hevur fingið fiskiloyvini, sum "Ljósafelli" hevði, men afturat hesum verður tørvur á fleiri veiðumøguleikum í altjóða sjógvi. Her kemur búrfiskurin í fremstu røð. Men her eru eisini avmarkingar. Menn eru farnir at stúra fyri búrfiskinum, tí hann veksur so spakuliga og tað sigst, at hann er 100 ára gamal, áðrenn hann er gýtingarførur. Men havið er stórt, og við tí dugnskapi, sum føroyskir fiskimenn eru kendir fyri, man hetta fara at eydnast.



*Hildur er komin umborð at siga dreinginum, Karl Kjærbo, farvæl.*



*Sonurin er eisini komin umborð at siga pápanum, Búgva Johansen, farvæl.*

### Bæði fryst og feskt

Ætlanin er bæði at frysta og at landa feskt, og tað er ein styrki, at skipið hevur báðar møguleikarnar. Hetta merkir eisini, at tað er ikki sami tørvur at avmarka túralongdina sum á einum ísfiskatúri. Túrarnir kunnu byrja við at veiðan verður fryst, og tá verður allur fiskurin skráskorin. Men seinni kann veiðan so ísast í kassar, og tá kann fáast tað meira burtur úr hesum parti av veiðuni, sum feskfiskurin gevur. Tískil verður roknað við, at túrarnir vara 1-2 mánaðir.

Av nýhugsan er, at ísmaskina er umborð, og ætlanin er at ísa fiskin beinanvegin, hann kemur á dekkið, eisini um hann seinni verður frystur. Hetta tryggjar ein framúr feskleika, sum uttan iva kann geva veiðuni eitt gott orð og umdømi og harvið hægstan prís.

Tað verður neyvan nógv, sum verður landað í Føroyum. Fiskasløgini, roynt verður eftir, eru bert í lítlan mun tey, sum tað loysir best seg at landa í Føroyum. Roknað verður við at landað verður fyrst og fremst í Spania, har teir eisini hava landað veiðuna hjá "Roc Amadour".

Vit á FF ynskja manningini góða eydnu við skipinum við vón um, at hetta tiltak fer at eydnast til gagns fyri alt okkara samfelag.

Reiðari er Hans Andreas Joensen í Hósvík, sum eisini er ein framburðsmaður innan fiskiskap.



*Reiðari er Hans Andreas Joensen, slóðbrótari frá ungum av.*

## Viðmerking til ullagrein

Í seinasta blaði høvdu vit ein stubba í sambandi við føðingardagin hjá Ebbu Wang, um tá hon arbeiddi fyri Johan Evensen "Spinnaran". Her er okkurt sum kann misskiljast, og Ebba ger vart við, at tann ull, ið kom frá fólki til spinningar, var altíð rein og nosslig. Tað var tí ongantíð neyðugt at vaska ull fyri fólk. Men tað kom fyri, at fólk seldu ull til Evensen, og tann ullin var oftast óvaskað. Hon mátti vaskast, og tað fór fram í tí vaskarínum, sum hoyrdi til gamla hospital.

# Hvat kann gerast fyri Suðuroynna?

**Ráðstevnan í Øravík reisti nógvar spurningar. Svarini eru upp til okkum sjálvi at geva. Men lætt verður tað ikki. Og tað kemur eisini at kosta.**

Hesin sera lætti spurningurin um hvat kann gerast fyri Suðuroynna man vera ein tann truplasti at svara. Men ein roynd varð tó gjørd á fundinum, sum varð hildin í Øravík tann 25. januar. Hann var fyriskipaður av peningastovnunum, sum hava virksemi í oynni, og skipað varð fyri sera áhugaverdum framløgum. Vit hava bert møguleikan at viðgera ein lítlan part av tí, sum varð lagt fram. Allar framløgurnar eru at finna á heimasíðuni: www.suduroy.nu

Áhugin fyri fundinum var stórur, tí ikki færri enn 110 fólk luttóku. Av hesum var ein fittur partur norðanífrá. At áhugin hjá politiska toppinum eisini var stórur, sást av, at ikki færri enn 5 landsstýrismenn vóru við. Og vit eru ikki illavorðnir at vit fara at gita, at hetta hevði samband við, at teir allir eru uppstillaðir sum valevni til fólkatingsvalið!

### Fra storhed til fald

Søgan um Suðuroynna og serstakliga sunnara partin er ein vinnulig sorgarsøga.

Fara vit nóg langt aftur í tíðina var Suðuroyggin vinnuligi høvuðsdepilin í Føroyum. Her hoyrdi stóri parturin av skipaflotanum heima, og fiskimenn og fiskagentur fóru í stórum tali til Suðuroyar at fáa sær arbeiði, og nógv blivu verandi.

Mest hevur verið at hoyrt um Tvøroyri í hesum sambandi, men sum tað kom fram í samrøðuni, vit høvdu við vágbingin Andrew Godtfred seinasta summar, var tað í hansara tíð sum ungur, Vágur, sum var frammanfyri Tvøroyri, tá tað snúði seg um virksemi.

Og tað er júst her, at tann stóri trupulleikin er í dag. Sambært framløgdu tølunum var arbeiðsloysið í sunnaru helvt 14%, meðan tað "bert" var 6% í norðaru helvt. So her er nógv broytt.

Í Vági vóru nógv stór reiðarí, sum t.d. á Gørðunum. Hesi góvu nógv arbeiði, men fóru so við og við í søguna. Men tá var tað, at Jákup í Lopra stakk seg upp og fekk sett á stovn størstu fyritøku í landinum í nýggjari tíð við nógvum skipum og einum tí fremsta flakavirki í okkara parti av heiminum, nevniliga Polarfrost.

### Hevði rentuinntøku

Hvussu framkomið virkið var, og hvussu væl tað varð rikið, kann verða lýst við fylgjandi dømi: Tá Ráfiskagrunnurin plagdi at rokna út tørvin á skiftisavlopi hjá flakavirkjunum, nýtti hann fýra vælrikin virki sum grundarlag, og Polarfrost var eitt teirra. Men meðan øll hini virkini høvdu rentu**útreiðslur**, so hevði Polarfrost rentu**inntøkur**. Tað hevði gingið so væl hjá virkinum rakstrarliga, at teir fingu meira í rentu av eginognini, enn virkið hevði í rentuútreiðslum av skuldini! Tað hava ikki verið nógv dømi sum hetta fyri virki á landi. Tað var annars so effektivt, at tá líðugt var at landa, var eisini liðugt at virka fiskin.

Men so kom skrædlið í 90-unum. Hevði Polarfrost tá staðið einsamalt, hevði tað uttan iva yvirlivað. Men her var so nógv tengt saman, at alt virksemi hjá Jákup fór av knóranum.

So við og við fóru skipini í gongd aftur við nýggjum eigarum. Men ikki Polarfrost sum flakavirki. Tað má roknast sum eitt av paradoksunum frá teirri tíðini, at fremsta flakavirki – í hvussu er í Føroyum – varð niðurbundið, sum vit øll kenna tað. Úrslitið var, at í fjør varð so at siga eingin ráfiskur landaður og virkaður í Vági. Stórt sæð einastu framleiðslurnar av fiski vóru í Hvalba og á Tvøroyri.

Tað er óneyðugt at greiða meira frá søgu. Hana kenna tey flestu, men eitt lítið ljóspunkt er kortini at hóma. Jákup í Lopra hevur, hóast 75 ára gamal, ikki heilt slept endanum. Vit greiddu í summar frá hansara virki í Lopra, og at hann longu tá hevði ætlan um at fara undir virksemi har. Og nú frættist, at hesar ætlanir eru meira ítøkiligar, og vit kunnu tí bert vóna, at hetta kann verða eitt íkast til vinnuliga loysn fyri sunnarapartin av Suðuroynni.



*Jákup Joensen er kanska ein lyklapersónur at fáa gongd aftur á flakavirksemi í sunnaru helvt av Suðuroy.*

### Dennis Holm: Gongdin byrjaði í 50-unum

Tað kom fram á ráðstevnuni, at skeiva gongdin í Suðuroy er ikki nýliga íkomin. Dennis Holm frá granskingardeplinum fyri økismenning hevði eina áhugaverda framløgu um gongdina í Suðuroy síðan 1950. Verður fyrst hugt at fólkatalinum í Føroyum sum so, er tað økt við umleið 50% hesi seinastu góðu 50 árini. Størsta økingin er í økinum kring Havnina, har tað er nærum trífaldað. Men Klaksvík hevur tó klárað miðalhækkingina fyri landið.

Í Suðuroynni er fólkatalið minkað við nærum 20% hesa tíðina. Oyggin helt støðuna fram til 1958. Tá fór fólkatalið niður um tað, sum var galdandi í 1950, men serliga er tað fallið síðani kreppuna í 90-unum. Hetta merkir aftur, at meðan tað í 1950 búðu 20% av føroyingum í Suðuroy, er hetta tal nú komið niður í eina helvt av hesum, nevniliga 10%. Fremsta orsøkin fyri hesi gongd er fráflyting og frá 1990 til 2003 hevur nettofráflytingin úr Suðuroy verið uml. 700 fólk.

Tað eru tey ungu sum flyta. Ofta er tað fyri at fáa eina útbúgving, men er einki at koma aftur til, so koma tey heldur ikki aftur. Hetta broytir aftur aldurssamansetingina, so tað verða fá ung og uppá seg nógv gomul.

Hetta hevur so aftur ávirkan á burðaravlopið, t.v.s. munin millum tey, sum verða fødd, og tey sum doyggja. Og her er Suðuroyggin einasta øki í Føroyum, sum hevur beinleiðis **burðarundirskot**.

So her er talan um eina ónda ringrás, sum verður sera trupul at venda. Í besta fall fer hetta at taka sera langa tíð.

### Leivur Mohr: Eintáttaður fiskifloti í Suðuroy

Leivur Mohr frá Føroya Banka, sum upprunaliga er vágbingur, hevði eina framløgu um fiskivinnuna í Suðuroynni. Fyrst greiddi hann frá fiskivinnutølum fyri landið sum heild, og síðan setti hann tey í samband við Suðuroynna.

Sigast kann, at flotin í Suðuroynni er rættiliga eintáttaður og tilsvarandi sárbarur. Her er einki nótaskip, eingin flakatrolari og eingin rækjutrolari. Nýskapanin er tó "Ran", sum er umrøddur í aðrari grein. At einki nótaskip er í Suðuroynni er eisini eitt paradoks. Stóra virksemið hjá Jákup í Lopra byrjaði jú við línubátinum "Akraborg", sum mitt í 60-unum varð umbygdur til nótaskip, og hetta gekk so væl – sum greitt er frá frammanfyri – við tí virksemi, sum fylgdi við. Gøtumenn gjørdu tað sama við línubátin "Finnur Fríði", og í dag er Gøta miðdepil fyri nótaflotan, og er henda bygdin í eini heilt aðrari støðu.

Taka vit feskfiskaflotan, er Suðuroyggin væl umboðað við djúpvatnstrolarum, har 9 av 13 hoyra heima í oynni.

Men taka vit partrolarar eru bert 2 av 30 heimahoyrandi í oynni. Hetta er eisini eitt paradoks. Tann tíð tað var, var ein heilur floti av partrolarum heimahoyrandi í Vági. Og tað er júst við partrolarunum, at møguleikar eru at fáa fiskin landaðan og virkaðan í landi við øllum tí arbeiði sum tað hevur við sær. Men her eru fiskiloyvir seld av oynni, og harvið eru hesi arbeiðsplássini farin með alla.

Av 20 línuskipum er 1 í Suðuroynni, og av 8 garnaskipum eru 2 í Suðuroy. Tað var annars í Suðuroynni, at júst henda veiðan stakk seg upp fyrst í 90-unum við júst tveimum skipum, so vøksturin hevur verið aðra staðni í landinum.

Av samlaða veiðuvirðinum hjá feskfiskaflotanum upp á eina mia. verður fiskur fyri 200 mio. kr. veidd av skipum í Suðuroynni. Hesi veiða eini 19.000 tons, men av teimum verða bert tey 7.000 tonsini landað í Suðuroynni. Hetta talið virkar sera løgið, men tað eru tó orsøkir fyri hesum. Ein er, at djúpvatnstrolararnir í stóran mun veiða alternativ fiskasløg so sum stinglaks og annað, og hesi fiskasløg kunnu enn bert seljast við lønsemi í útlandinum. Men arbeiðast má fyri, at tað skal gerast møguligt at avreiða hesi fiskasløg lønandi í Føroyum. Síðani eru eisini onkur viðurskifti millum virkini í Suðuroynni, sum eggjar monnum heldur at landa uttanlands. Tað kann í hvussu er ikki verða góðkent.

Tað verður eisini ásannað, at meira kundi verið landað í oynni, og hetta skuldi "fiskapakkin" eisini kunnað hjálpt uppá.



*Virkið í Lopra er nærum klárt at fara í gongd. Kanska fer okkurt at henda her.*

*Framhald á næstu síðu*

Tað hava verið nógv uppskot um menning av flakavinnuni í Suðuroynni. Eitt er møguleikarnir fyri feskari framleiðslu, sum verður roknað at vera fremsta alternativið, um vit skulu kappast við lága kostnaðarstøðið í Kina. Her skuldi Suðuroyggin ligið væl fyri, tí hon er so nær Bretlandi. Tí eru nógv, sum meta tað at vera eina vanlukku, at "Teistin" á sinni varð seldur, og beinleiðis samskiftið hjá Suðuroynni við meginlandið fór í søguna.

Stóra málið er tí at fáa bøtt um hendan skaðan. Her má tað almenna eisini eiga sín leiklut.

Magni Laksafoss:
### Stuðul við skili

Magni Laksafoss hevði eisini eina framløgu. Magni er kendur sum búskaparfrøðingur og eisini frá politikki.Tað er bert spell, at ein slíkur maður ikki tykist at sleppa framat á politiska leikvøllinum, tí hann hevur nógv áhugaverd og hugvekjandi sjónarmið, og hann umboðar á mangan hátt tiltrongda nýhugsan.

Seinastu tíðina hevur hann arbeitt serliga við Suðuroynni, og tað var eisini sera áhugavert at hoyra hansara sjónarmið.

Hann vísti á, at trupulleikarnir í Suðuroynni fyri so vítt eisini vóru galdandi fyri Føroyar sum heild, og her er tað globaliseringin, sum er á skránni, t.v.s. kappingin frá restina av heiminum. Eitt dømi um hetta er kappingin frá fiskiídnaðinum í Kina, men onnur lond kunnu gerast eins stór "hóttan". Hetta merkir, at vit missa burtur av gomlum vinnum. Fyri at kunna halda tørn, mugu vit fáa minst líka nógv av nýggjum vinnum afturfyri.

Her má ásannast, at Føroyar eru eftirbátur í at tillaga okkum hesar nýggju umstøður. Her telur tað ikki minst, at Føroyar eru serliga heftar at útflutningsvinnu, og hesar krevja ein hægri produktitivtetsvøkstur enn aðrar vinnur fyri at klára seg í kappingini.

Magni legði dent á, at fyri at klára seg í kappingini var neyðugt við avmarkaðum lønarvøkstri, men vit skulu heldur ikki kappast um at hava lágar lønir, tí tá fæst ikki hendur á kvalifiseraðari arbeiðsmegi. Og tá tosað verður um lønarvøkstur, so eru Føroyar – samanborið við grannalondini – tað landið, sum hevur havt lægsta lønarvøksturin síðan 1990. Her kann skjótast inn, at tá tosað hevur verið um stóran lønarvøkstur í Føroyum, hongur hetta eisini saman við tí smáa upsanum, sum sjálvsagt krevur fleiri tímar at arbeiða enn stórur upsi.

Tí eiga vit at velja vinnugrein, har vit kunnu vera fremst, og har vit kunnu klára okkum í kappingini. Men tað krevur dirvi at fremja neyðuga politikkin.

Hetta krevur ein virknan vinnupolitikk. Her eru fleiri møguleikar.Tað kann vera at stuðla uppundir vinnur, sum man roknar við fara at klára seg væl ella vinnur, sum longu gera tað.

Viðvíkjandi stuðli segði Magni, at her vóru vit farin úr eini grøv í aðra. Tað er skjótt at semjast um, at fyrr í tíðini góvu vit studning uttan skil, meðan tað nú er nærmast eitt banniorð at nevna studning. Nú var støðan tann at lata tað fara, sum ikki kann klára seg, uttan mun til avleiðingarnar.

Magni helt tó ikki, at tað var nakað forgjørt í at geva stuðul, sum kann varðveita arbeiðspláss, sum annars vildu farið fyri skjeyti.Tað kundi í hvussu er vera skil í tí, inntil vit fingu onnur meira burðardygg arbeiðspláss, og tað er júst hesa støðu, vit eru í nú sum t.d. í sambandi við rækjuvinnuna.

Magni nevndi eisini vinnupolitikkin í øðrum londum, sum hava havt stóran framburð seinastu árini. Eitt slíkt dømi er Írland, har tað m.a. hevur verið satsað uppá útlendskar íløgur, og lóggávan er lagað til tað. Hetta hevði eisini givið úrslit. Men ein onnur fortreyt fyri hesum er eisini ein munandi stuðul frá ES. Og var hetta tískil ein stuðul, sum hevði loyst seg.

Men fyri at koma aftur til Suðuroynna, so krevst bæði ein langtíðarloysn og ein bráðfeingisloysn. Magni kom eisini inn á Suðuroyarætlanina hjá landsstýrinum. Hann helt, at fleiri av uppskotunum vóru góð og neyðug, og tey komu at hjálpa **nakað** uppá trupulleikarnar. Men hetta var langt frá nøkur endalig loysn.

### Suðuroyarætlan uttan pening

Óli Jacobsen vísti á, at løgmaður hevði sagt við fjølmiðlarnar, at suðuroyarætlanin kom ikki at kosta meira enn tað, sum longu var avsett til tær ymisku verkætlanirnar. Óli vísti á, at hann hevði verið til Sandoyarætlanina á sinni, har 3 mio. kr. vórðu settar av til endamálið, og at henda ætlanin bjargaði Sandoynni.

Spurningurin er, um tað yvirhøvur kann vera talan um eina veruliga ætlan, um hon ikki kemur at kosta eina ávísa upphædd. Hesum var Magni samdur í. Tað má tykjast løgið, at hetta als ikki er tikið uppá tungu, ikki minst tá ein samgongumaður segði í fjølmiðlunum, at samgongan var til reiðar at gjalda tað, sum ein slík ætlan kostar. Hetta var tað, sum varð gjørt í Írlandi. Ætlanin kostaði pening, men peningurin kom so sanniliga eisini aftur.

Tað vóru fleiri aðrar áhugaverdar framløgur, sum vit ikki fáa pláss at viðgera á hesum sinni, men vit fara at koma aftur til evnið í komandi blað. Ikki minst tí trupulleikarnir í Suðuroynni kunnu skjótt gerast trupulleikarnar hjá okkum øllum.

Nú ræður bert um, at menn ikki sleppa endanum, nú ráðstevnan er farin afturum. Tað krevst nevniliga eitt stórt og miðvíst arbeiði at fáa Suðuroynna, og ikki minst sunnara partin, uppá fót.



*Nógv fólk varð á ráðstevnuni.*



*Orðstýrarar á ráðstevnuni vóru Søren Bruhn og John Mortensen.*



*Løgmaður hevði eisini orðið.*



*Leivur Mohr greiddi frá fiskivinnu í Suðuroy.*




Við okkurt um 25.000 ymiskum vørum á hyllunum, stendur landsins største goymsla av eykalutum til taks hjá føroyska flotanum. Aftanfyri stendur eitt samtak av trimum føroyskum skipasmiðjum og einum mekaniskum verkstaði, ið hevur meir enn seksti ára royndir innan veitingar til skipaflotan – alt frá smærri umvælingum og viðlíkahaldi til um- og nýbygging av skipum.

Góðkendir tænastuveitarar av:
Wärtsilä
Deutz-MWM
Scania & Valmet
Callesen
Ulstein Brattvaag
ABB-Turbochargers
Desmi pumpum

stephanssons hús

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Tlf. +298 31 11 55
Fax +298 31 11 25
e-mail: info@faroeyard.fo

**P/F Skipasmiðjan á Skála**
Tlf. +298 44 11 55
Fax +298 31 44 25
e-mail: skala@faroeyard.fo

**Vestmanna Skipasmiðja**
Tlf. +298 42 40 10
Fax +298 42 40 05

**Runavíkar Mekaniski Verkstaður**
Tlf. +298 44 70 36
Fax +298 44 78 34

**www.faroeyard.fo**

# Tá ið "Slangan" fór á land 16. februar ár 1900

Petur í Køkini, sum nærmast við einum unduri bjargaðist í Skaðagrindini, varð umhildin maður, sterkur til likams og sálar, sum hendan frásøgnin hjá Bjarna Skaalum ber boð um.

Ofta hevur verið skrivað um og sagt frá hendingum og brøgdum. tá Tvøráskipið "Slangan" fórst á Hvalbiarsandi í einum herviligum ódnaðarveðri.

Umframt tað, ið stendur í Siglingarsøguni, kann kanska vera áhugavert at leggja afturat, tað, sum faðir mín, Einar Skaalum, segði mær frá einaferð á vári 1962.

Óli Vestan Tún var handilsmaður í Hvalba, sum var ein tann størsta bygdin í Føroyum, tann tíð tað var.

Óli handlaði fyri Mortensens handil á Tvøroyri. Dóttir hansara Elsebeth Kristine Skaalum var gift við Jógvan Mortensen, keypmanni, Tvøroyri f. 6/3-1846 – d. 1914.

Hendan áður nevnda dagin í februar, kom "Slangan" um 2-tíðina við vøru til handilin Vestan Tún. Hetta var ein hampuliga góður dagur, men trýst var í luftini og dimmligt var í veðrinum; sjógvurin var tungur, men lítið og onki lot – tá.

### Mongum brestur ætlan

Ætlanin var at gera seg lidnan við lossingina sama dag, men út á kvøldið máttu teir gevast, tí tá fór veðrið at øtla so mikið, at tað ikki var ráðiligt at halda áfram.

Og veðrið stóð bara við og versnaði, so tað var ikki hugsingur um at fara nakran veg. Tá ið liðið var væl út á náttina, hoyrdu fólk á landi tokulúðurin og skipsklokkuna á "Slanguni", og tað boðaði ikki frá góðum í hesum óhugnaligа náttarmyrkrinum. Men hvalbingar vóru kvikir av koyggjuni og komu til hjálpar.

### Hvalbingar fara at bjarga

Skálagarður lá næstur, tí mundu eisini skálamenn vera bæði fyrstir og flestir.

Tað var øllum greitt, at stórur vandi var fyri hond; vindurin var vaksin til rokstorm, so "Slangan" dró akkerini og dreiv inn á sandin.

Allir menn komu saman á "Mølini" og tosaðu um, hvat gerast skuldi – og tað var ongin tíð at drála.

Við Petur í Køkini á odda, vóru allir skjótt samdir um at velja rætta bátin, sum kundi fara út at bjarga manningini á "Slanguni".

Avrátt varð at fara út við Giljabátinum, ið var eitt stórt 10-mannafar. Síðan mannaðu teir frægastu menn av Skálagarði bátin og løgdu til brotns.

Mogum verður væl fjálgað um, men ikki eru øll á tingi. Tí skulu nevnast teir, sum vóru við í bjargingartiltakinum av manningini á "Slanguni". Tí munur er á at bjarga sær sjálvum og at bjarga øðrum, sum ein enntá ikki kennir. Hesir vóru menninir: Petur í Køkini, Napoleon Skaalum, Vestantún, Poul Uppi í Garði, Lávus Holm (í Køkini), Jógvan Nattestad, Rasmus (Lemvig) Sigerskjold, húskallur Vestan Tún, Kristian á Bakkanum, Niels á Bakkanum, Niclas uppi í Garði og Dánjal í Garðsenni. Jógvan Vestan Tún ætlaði sær eisini við, men hann noyddist aftur til húsar, av tí at sjúka kona hansara var versnað so mikið nógv, at hann mátti setast aftur.

### Menn settust til árar

Men hinir settust til árar og løgdu frá landi. Tó, sum tað stendur í Rólants kvæði; tríggjar ferðir royndi hann Rólant Jall Dýrindal at bróta; soleiðis vóru tvær royndir gjørdar, men hvørga ferð eydnaðist at sleppa út til skipið av "Mølini", og báðar ferðir endaði báturin heilt niðan um "Skørini" – langt uppi í sanddeildunum; men báturin bleiv so drigin út eftir Skálabakka, oman aftur á Mølina.

Tá ið lagt var út á triðja sinni, vóru teir bara 7 mans eftir á 10-mannafarinum.

Hesaferð høvdu teir eftirstjóra á honum; annan endan hildu menn í heilt uppi í sondunum fyri at rennisjógvurin, sum var av tí grovasta, ikki skuldi snara bátin tvøran.

### Á triðja sinni

Tær báðar fyrru ferðirnar, kom hann ikki nær námind "Slanguni", men hesaferð eydnaðist at sleppa heilt upp á síðuna av skipinum, sum nú lá tvørt fyri í briminum og lívdi av tí sama eitt sindur, nú ið báturin var skotin út av sandinum.

Øll manningin á "Slanguni" – 5 í tali – var til reiðar í røttu løtuni og slapp í bjargingarbátin í øllum góðum, og tað var alt í einum, at ein fylling tók bátin inn á sandin. Hann var í somu øði drigin upp á land og settur niðan í "Fútagarðin" (har húsini hjá Reynold Holm nú eru).

### Petur og Dánjal

Petur í Køkini fór við tí yngsta av manningini, Dánjal Vejhe (Heygsbóndin), á bakinum líka heim á Skálar.

Dánjal var bara 15 ára gamal tá, og var illa komin á hold, sum vera man.

Tá ið Petur í Køkini og Dánjal vóru komnir út til kelduna á Bakkanum, har umleið, krambúðin Vestan Tún stóð, støðgaði Petur á og hugdi yvir á sandin; tá sá hann, at "Slangan" flaknaði í brimbrotunum; so tað var í evstu løtu, at hjálpin náddi teimum neyðstøddu.

Hinir av manningini á "Slanguni" vóru: Hans Pauli Kjærbæk, Nellie Palli róptur. Hann var kendur um allar Føroyar, bæði sum skipari og sjógarpur fyri mongu brøgd síni.

Bestimaður var Jens Michael Jensen. Hinir báðir vóru Danjal Johan Kjærbæk, (bróður Nellie Palla) og Palli í Mýruni. Palli í Mýruni var ættaður úr Øravík. Hinir vóru allir úr Porkeri.

### Brosmur og smáfiskar skolaðu uppá land

Fyri betur at lýsa, hvussu ringt veðrið var, kann her verða skoytt uppí, at brosmur og smáfiskur lógu vestur ímóti húsunum á Heyggi, og træbrúgvin, sum lá um ánna á Skørinum, aftan á ódnaðarveðrið lá uppi í Hamarsmýrum, meðan ein lossijakt, sum teir hjá Mortensen áttu og var fortoyað í Hvalba, lá hálvt uppi á bakkanum, har húsini "við Bakkhús" nú standa.

### Petur í Køkini boðin í brúdleyp í Sumba

Tá dóttir Danjals í Búðini (sum Danjal Johan Kjærbæk varð róptur) seinri giftist til Sumbiar, var Petur í Køkini júst og ferðaðist har suðuri. Tá ið Danjal frætti, at Petur var staddur har í bygdini, leitaði hann Petur upp og bjóðaði honum við í brúdleypið.

Tá teir heilsaðust, kysti Danjal hin á kjálkan, so rørdur var hann, nú teir sóust aftur – fyrstu ferð síðan "Slangan" fór á land í Hvalba.

Johan í Búð skuldi einaferð siga: "Allir eru menn í Skálatúni". Men tá vóru so sanniliga menn á Skálagarði.



*Anna Kathrina Lisberg, (f. 1841, d. 15/9-1912) vanliga nevnd Annika saman við ommubørnum.*

*Aftast frá vinstru: Johanna Maria Joensen (gift við Even Christian Skaalum. Hann datt oman í Villingabergi 19/3-1956).*

*Kristiane Jacobine Joensen (vanliga nevnd Sjanna, mamma Bjarna Skaalum), og høgrumegin: Niels Petur Joensen, yngri.*

*Í fanginum hevur Annika ommudóttrina Onnu Schrøter. Hini bæði ommubørnini eru Karin og Flemming Krohn, búsett í Danmark.*

*Myndin er tikin umleið 1907.*



***Lávus í Køkini:** Niels Olaus Holm, vanliga nevndur Lávus í Køkini, giftist 1/11-1877 við Anniku, sum misti fyrra mannin í 1874, sum var pápi Petur í Køkini.*

*Á myndini er Lávus saman við abbabørnum. Vinstrumegin, Anna Schrøter, høgrumegin Esmi Schrøter, og fanginum hevur hann Olaf Schrøter. Mamma børnini er Petra Joensen.*



Bjarni Skaalum, abbasonur Petur í Køkini, hevur altíð sýnt stóran áhuga fyri søguligum viðurskiftum, og hevur latið okkum meginpartin av tilfarinum á síðunum 9, 10, 15 og 16.

Bjarni Skaalum er føddur 24. apríl 1924 í Hvalba. Foreldur: Einar Skaalum, (f. 1896 – d. 1978) og Christiane Skaalum, vanliga nevnd Sjanna (dóttir Petur í Køkini, f. 1896 – d. 1973), bæði fødd í Hvalba.

Bjarni Skaalum er av læraraætt; pápin og abbin, Óli Nicolai Skaalum, vóru lærarar. Óli Nicolai var í langa tíð lærari í Hvalba og Sandvík. Eftir at hava lokið preliminerprógv tókst Bjarni við fyrifallandi arbeiði. Eina tíð undir krígnum arbeiddi hann hjá bretum. Á sumri 1944 við "Maritanu" í ísfiskasigling, og í 1945 var hann eina tíð uppi í Íslandi og arbeiddi. Men um heystið tað árið fór hann til Danmarkar fyri at útbúgva seg til lærara. – Bjarni tók læraraprógv á Jonstrup Statsseminarium í 1950 og sama ár sloydlæraraprógv á Dansk Sløjdlærerskole. Hann var, áðrenn hann kom aftur til Føroyar, vikarur í Bøsserup á Sælandi. Fyribilssettur 2. lærari í Porkeri tann 1. sept. 1950 og fastur lærari 1. des. 1952. Hann hevði ársskeið á Danmarks Lærerhøjskole 1954-55. Las til orðblindalærara á Detlefsen og Jacobsens ordblindeskole, har hann tók prógv. Fekk 1. aug. 1955 autorisatión sum lærari fyri orðblind. Í sept. 1959 varð Bjarni settur lærari við Vágs skúla. Ársskeið á Danmarks Lærerhøjskole 1962-63. Yvirlærari 1. sept. 1964. Bjarni er giftur við Elsebeth Mariu (vanliga nevnd Ebba), fødd Vinther, 7. des. 1923 í Brekkugerði í Vági. Bjarni fór frá við eftirløn í 1991. Ebba og Bjarni búgva í Toftalíð í Vági.

Framhald á næstu síðu

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA





Johan Joensen, bróðir Petur í Køkinum, var 15 ára gamal, tá hendan hendingin fór fram.

# Mín fyrsti dagur á sjónum

## Tá Petur í Køkini einaferð lá á sjúkrahúsi, skrivaði hann hesa frásøgn.

Mín fyrsti dagur á sjónum var 11. oktober 1881. Eg vil her royna at siga frá, hvussu hesin dagurin gekk.

Fyrst skal eg siga frá manninginі:

Johan bróður, ið tá var 15 ára gamal og stórur og sterkur, sum kundi hann verið á átjanda ári. Hartil var hann fullvandur útróðrarmaður.

Pól, sum tá var 11 ára gamal, hevði ongantíð fingið upp í lag at vaksa, og hvat ið heilt setti ein steðg fyri tí, var, at hann veturin frammanundan hesum degi, fekk eina sjúku, sum legði hann á songina í fleiri mánaðir. Hetta mundi helst vera tann sjúkan, ið tey tá ið tíðini róptu landfarsótt. Tað var alt tað, at Pól slapp undan. Ofta plagdi tað vera so, at ung fólk, aftaná eina sovorðna sjúku, tóku vøkstur undir seg, men Pól kvinkaði ikki – hann var ið hvussu er 2 ár aftanfyri sín aldur.




Staðarnøvn nevnd í frásøgnini:
1. Tjørnunes
2. Lundanevn
3. Hvannhagi
4. Frobiarbotnur
5. Froðbiarnípa

### Petur 10 ára gamal

Eg sjálvur var 10 ára gamal tá og legði longd til tey 11.Tó at Pól var 11 og eg 10, so var tað á henda hátt ikki meir enn 1 ár ímillum okkum í munuleika. Men tað sama, vit vóru hvørgin fyri nakað at kalla, ið hvussu er til slíkar brestir, ið her er talan um.

Henda 11. oktober var dýrdarveður um morgunin, og í Hvalbø var hvør bátur á floti. Johan var tó ikki farin nakran veg. Bátsmenn hansara vóru hindraðir av einum hvørjum. Johan fann tí uppá at fara út í fjørðin við Póli og mær. Tá ið vit fóru frá landi var eitt lítið fleyr vestaneftir, so vit hongdu seglið upp, men minni enn so at tað stóð frá, ella fult, men tó lótu vit tað hanga uppi. Eitt lítið sindur ók báturin fram, og ið hvussu var, Pól og eg hildu væl um. Vit vóru ikki vanir at sigla við stórari ferð og ikki mundi hava miklan hast. Seglið varð hangandi uppi til vit komu út fyri urðina, ið er innan fyri ***Tjørnunes (1)***.

### Innanfyri Tjørnunes

Har løgdu vit seglið. Eg veit ikki hví, tað sá næstan út, sum vóru vit farnir hagar at hyggja okkum eftir eini lendistøð, ella kanska beinari sagt kirkjugarði, til tveir tímar seinri.

Vit byrjaðu nú við at dyrgja fyri at fáa seið til agn, men fingu ongan. Har var ikki heldur dyrgjandi, tí ov nógv alda var upp á landið. Vit fóru so til árar inn og noður gjøgnum fjørðin. Eg veit ikki hví, teir hava kanska væntað umskiftan í veðrinum. Eg tonkti ið hvussu er ikki yvir hetta.Tá ið vit vóru komnir mitt norður í fjørðin (innan fyri boðan), tá loysti út æl úr útnorðingi.

### Tað hvítnaði í bø og haga

Tað hvítaði fyrst haga og síðani bø eftir seg, og tað bleiv ikki minni hvítt, tá á sjógvin kom.Tað ikki bert glaðaði, men reyk soleiðis, sum ein fáar ferðir í lívinum sær tað rúka. Ja, sjálvt um ein verður gamal maður. Skjótt vóru vit staddir mitt í rokinum. Eg sat í siglirúminum í stýriborð (ella á norðan). Pól sat í hitt borðið á sama bekki, og Johan í rúminum við tveimum árum. Nú veit eg ikki, um tað var orsøkin, at eg havi verið betri maður enn Pól, men báturin fall suður um vindin, og tað varð okkara frelsa. Fell báturin norður um vindin, so fóru vit til havs ella komu at landi so langt úti, at bjarging var vónleys. Tað, at báturin fell suður um vindin, hevði tær góðu fylgjurnar, við tað at róð varð upp ímóti í sunnara borð, at hann fór ikki beint undan vindinum, men deysaði meira suður á landið. Eg hevði ikki sitið ættiliga leingi við árina eftir at stormurin var komin, fyrr enn eg misti hana. Eg minnist ikki hvussuleiðis, antin homlubandið man vera slitnað, ella eg kanska ongantíð havi havt nakað. Pól og Johan róðu upp ímóti í sunnara borð, men ómøguligt var at leggja bátin heilt upp í. Fyri meg var tá einki at gera, og helst hava teir biðið meg farið fram undir rong, ella eg havi valt tað sjálvur. Har fór eg í øllum førum. Tað var lítið ærufult at liggja har og bogra, men eg havi forlátið mær tað, tí eg var jú bert eitt barn. Kanska var tað heldur ikki so galið, at eg legði meg har, tí tey 50 pundini, ið eg vá, gjørdu kanska bestu nyttuna har. Vektin á mær hjálpti helst til at halda bátinum upp ímóti vindinum, so hann ikki var so nógv útsettur at hvølvast.

Eg minnist at Pól onkuntíð græt, og eg minnist eisini, at eg, sum tað fámti eg var, smíltist at honum. Ólukkudýrið, hann var jú sama barnið sum eg. Ja, uttan tað, at hann hevði so mikið toygari sál, at hann fataði, at vit fóru at doyggja. Men tað fekk eg ikki reiðiliga at hóska hvat tað skuldi vera gott fyri – at vit skuldu doyggja.

### Bað Gud hjálpa

Men eg havi ikki bert verið djarvur, tí eg minnist, at eg bað til Gud um at hjálpa okkum. Og tað er fyrsta ferðin, sum eg minnist, at eg havi biðið til Gud, soleiðis sum eg tá meinti og síðan havi meint, at ein eigur at biðja til Gud. Ikki bara í orðum, men av hjarta. Báturin dreiv við góðari ferð og skjótt bar at landi.Tað var lítið lystiligt at síggja, at vit komu inn í hesa fyrrnevndu urð, og ikki bert tað, vit stevndu á tað ringasta plássið, sum var – tað største grótið uppi á landi og tey størstu skerini útifyri. Brim var, tí stormurin lá uppá, og noktast kann ikki, at hetta var øgiligt at síggja, men har var einki at gera.

### Tikin av óløgi

Men væl gekst, Harrin legði sjálvur á landi. Tað fyrsta óløgið, ið fekk fatur á bátinum, var so stórt, at tað tók hann inn um øll tey stóru skerini uttan at hvølvast. Síðani setti tað hann so langt upp á land, at lætt var at sleppa úr honum. Pól og Johan lupu á land alt í einum. Eg ætlaði at gera tað sama, men helt, at best var at royna at bjarga tí, sum bjargast kundi. Eg vildi hava tuflurnar við, men óheldiga vildi til, tí tær vóru fløktar inn í eitt snørið, so tað seinkaði mær nakað at fáa fatur á teimum.Tá ið Johan sá, at eg ikki kom, leyp hann eftir mær og rykti meg úr bátinum. Men nú lukkaðist ikki at sleppa niðan frá. Tað næsta óløgi kom og legði okkum heilt undir. Johan legði meg frammanfyri sær fyri at verja meg, og fekk so um ein stein.Táið undan aftur fjaraði, sluppu vit niðan frá. Tuflurnar hevði eg mist. Blóðið rann niður eftir bringuni á mær, og eg hevði fingið ein skurð upp undir høkuna. Skurðinum beri eg merki av enn.

Báturin var spildur nýggjur, bygdur sama summarið – fýra, fimm óløgi gjørdu hann til sneisar.

### Slopnir úr havsneyð

Ja, nú vóru vit slopnir úr havsneyðini, men enn høvdu vit nógv stríð eftir. 2½ fjórðing heim til húsa við tí ræðuliga veðrinum beint ímóti. Árið var somikið liðið, at kalt var, serliga í hesum storminum og á teirri ættini. Vattleysir vóru vit og á leistum og skjótt vórðu vit skóleysir. Ja, har var einki verandi stað. Vit hildu heim gjøgnum urðina, heim á Seiðagjógv. Teir vistu um, at táið menn fóru í urðina við lombum, so plagdu teir ofta at fara niður á Seiðagjógv. Teir høvdu tá band við sær at seta fast um ein pela og lótu tað so hanga til teir komu aftur. Men hetta kundu vit jú ikki gera.Tað fyrsta upp frá helluni gekk toluliga, men so møtti ein klettur, ið var ov høgur at sleppa upp fyri. Johan, bróður, hevði eisini verið til bjarga og hevði sæð, hvussu menn bóru seg at har. Hann tók Pól og meg og stillaði okkum so langt inn undir klettin, sum vit fingu staðið. Síðani steig hann upp á akslarnar á okkum, og á tann hátt røkk hann so langt, at hann fekk tak í erva og slapp upp. Síðani tók hann ein stein, høgdi sær spor so niðarlaga á klettinum sum til bar, og tók síðani leðurreimina av miðjuni og rætti hana niður til okkara. So hálaði okkum upp við henni.

Tá ið vit vóru komnir upp á Seiðagjógv, kom eitt áttamannafar strúkandi útfyri. Tað kom at leita. Teir vóru úti við ***Lundanev (2)***, men longu tá var so óført, at teir herjaðu ikki suður um. Tá ið vit vóru komnir á slætt, gekk skjótt, vit runnu tað vit vóru mentir, bæði fyri at skunda okkum til hús og eisini fyri at halda hitanum. Vit vóru í góðum standi, tá ið vit komu til hús. Gleðin var stór, tí vit vóru einastu synir. Sjey ár frammanundan vóru pápar okkara farnir í ta vátu grøv, ið vit júst vóru slopnir undan.

Nú vóru vit bjargaðir, men tað var ikki úti við tí. Tann báturin, ið var næstur okkum, setti á land á urðina, sum er sunnanfyri Lundanev, við tveimum monnum. Teir noyddust at sleppa bátinum og sita á urðini alla náttina. Fleiri bjargaðu sær í ***Hvannhaga (3)*** og aðrir í ***Froðbiarbotn (4)***. Men ein báturin náddi hvørki í Hvannhaga ella Froðbiarbotn. Hetta vóru tríggir menn úr Nesi.Tað var ein gamal maður, ið var nevndur Mikkjal uttan Garða, og Jens Ludvig, best kendir undir navninum Risin.Tað plagdi ikki vera so sjáldan, tá ið tað var eitt sert ómenni, at tað varð nevnt við einum kempunavni, fyri at spotta. Men so var ikki við Risanum. Hann var av sterkastu monnum og dámdi væl at brúka sína styrki. Hin triði var Johan Andreasen (Johan á Sondunum). Hann hevði sama sinnalag sum hin og var eisini ein merkismaður.

### Fingu land undir Froðbiarnípu

Teir fingu ikki land fyrr enn undir ***Froðbiarnípu (5)***. Har var ein vána skjólbakki, vindur og streymur gekk líka á land.Teir máttu flóta í munninginum á tí lítla holinum, ið er í Nípuni. Men har mátti ansast eftir hvørjum taki. Stundum rógva og stundum stinga á, og ansast mátti eisini eftir hvørki at koma út á vindin, ei heldur upp á land. Har máttu teir verða fyri náttina. Tá ið nakað leið út á kvøldið, maktaðist Mikkjal og mátti leggja seg niður í bátin. Hendan náttin fekk ein enda sum aðrar, men tá ið dagurin kom, var Mikkjal deyður. Veðrið var tá somikið linnað, at teir fóru at royna at sjagga inn í Ásdal, og tað eydnaðist. Teir løgdu at og Johan leyp á land. Risin skuldi gera tað sama, men tá var hann, eins og Sigmundur Brestisson tá hann lá í fjøruni í Sandvík, tá bóru ikki beinini. Johan mátti tí hjálpa honum á land og sleppa bátinum við líkinum, ið fór til havs. Risin hevði ikki bert sprongt húðina leysa undir iljunum, men eisini kjøtið frá beini, sum hann hevði spent alla ta longu tíð. Johan mátti bera hann til Froðbiar, haðani hann varð heintaður við báti so skjótt viðraði; hann lá á songini allan veturin.

Síðani er bert at siga, at Pól seinni varð ein mannligur og raskur maður, men bæði hann og bróður doyðu báðir á ungum árum.

***Petur í Køkini***

*Valnevndin fyri Føroya Fólkatingsvaldømi*

# KUNNGERÐ

Fólkatingsvalnevndin fyri Føroyar hevur fingið og góðkent hesar listar og uttanflokkalistar, til fólkatingsvalið týsdagin 8. februar 2005:

Listi A. Hin Føroyski Fólkaflokkurin (Radikalt Sjálvstýri):
Óli Breckmann, løgtingsmaður, Viðargøta 2, Argir
Bergur Bærendsen, býráðslimur, Øravíkarlíð
Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, Millum Gilja 121, Hoyvík
Tummas í Garði, yvirlækni, Varðagøta 15, Tórshavn
Hanna Jensen, lærari, Norðagøta
Kjartan I. Joensen, løgtingsmaður, Leirvík
Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, Viðareiði
Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, Garðavegur 40, Klaksvík
Poul D. Klementsen, bóndi, Sandur
Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, Bjarnavegur 10, Fuglafjørður
Poul Michelsen, løgtingsmaður, Gundadalsvegur 19, Tórshavn
Jákup Mikkelsen, løgtingsmaður, Undir Brúnni 39, Klaksvík
Bjarti Mohr, vinnulívsmaður, Debesartrøð, Tórshavn
Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, Sørvágur
Óli Nolsøe, agronom, Dalur
Annika Olsen, býráðslimur, Marknagilsvegur 39, 1.tv., Tórshavn
Ingi Olsen, bankamaður, Vestmanna
Ragnar S. Olsen, stjóri, Søldarfjørður
Rúna Sivertsen, fjølmiðlakvinna, Streymnes
Jacob Vestergaard, løgreglumaður, Akrar
Hjørdis Viberg, postkvinna, Toftir
Heðin Zachariasen, løgtingsmaður, Streymnes

Listi B. Sambandsflokkurin:
Helgi Abrahamsen, skrivari, Strendur
Hans Arne Bertholdsen, maskinmeistari, Garðsendi 7, Klaksvík
Svenning Borg, fiskimaður, Klingrugarður, Vágur
Johan Dahl, løgtingsmaður, Skúlalagið, Vágur
Marjus Dam, løgtingsmaður, Miðvágur
Erikka Elttør, krambakvinna, við Mylnutún 11, Klaksvík
Olav Enomoto, løgtingsmaðuri, Hornavegur 6, Vestmanna
Atli Hansen, stjóri, Norðagøta
Edva Jacobsen, bankakvinna, Stovugerði, Fuglafjørður
John Kári Jacobsen, skipari, Hvannasund
Edmund Joensen, løgtingsmaður, Oyrarbakki
Betta Joensen, lærari, Rættargøta 2, Klaksvík
Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, á Teigi 6, Tórshavn
Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Syðradalur
Marja Lamhauge, verkfrøðingur, Lambareiði
Høgni Mikkelsen, býráðslimur, Guttormsgøta 3, Hoyvík
Gunnar Nattestad, lesandi, Sandavágur
Bárður Nielsen, landsstýrismaður, Bøgøta 32, Vestmanna
Alfred Olsen, løgtingsmaður, Saltnes
Marjun Olsen, sjúkrahjálpari, Øravíkarlíð, Tvøroyri
Beate L. Samuelsen, býráðslimur, Varðalág 4, Tórshavn
Jaspur Vang, løgreglumaður, Tvøroyri
Eyðna Vidtfeldt, lesandi, Villingardalsvegur 1, Tórshavn

Listi C. Javnaðarflokkurin:
Sigfríður Abrahamsen, lesandi, um Heygar 3, Fuglafjørður
Thomas Arabo, verkfrøðingur, Signabøur
Rigmor Dam, lærari, Trapputún 6, Tórshavn
Soffi Egholm, psykoterapeutur, Leynar
Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Tvøroyri
Birgir Hansen, útróðrarmaður, Sørvágur
Sunleiv Højgaard, postboð, Runavík
Sylverius Jacobsen, smiðjumeistari, Skáli
Katrin Dahl Jakobsen, lærari, Villingardalsvegur 61, Tórshavn
Bjørg Joensen, tøkningur, undir Glaðsheyggi 16, Tórshavn
Elin Heðinsdóttir Joensen, málsviðgerði, Hoyvíksvegur 22A, Tórshavn
Randi í Jógvansstovu, forkvinna, Leirvík
Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, Líggjasarbrekka 61, Klaksvík
John Johannessen, løgtingsmaður, Brattabrekka 23, Tórshavn
Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, Skopun
Napolion Magnussen, borgarstjóri, við Eirikstoft, Miðvágur
Kristian Magnussen, løgtingsmaður, Dungagøta 13, Tórshavn
Birgir Mohr, fulltrúi, Sandur
Helena Dam á Neystabø, stjóri, J. H. Schrøtersgøta 20, Tórshavn
Jonhild Andreasen Nielsen, krambakvinna, Øravíkarlíð, Tvøroyri
Henrik Old, løgtingsmaður, Vágur
Andrias Petersen, løgtingsmaður, Syðrugøta
Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur, Jørundsgøta 40, Klaksvík
Mamy Dahl Sørensen, bygdarráðslimur, Viðareiði
Mikkjal Sørensen, bygdarráðslimur, Porkeri
Hans Pauli Torkilssonur Strøm, landsstýrismaður, Byrgisvegur 8, Vestmanna

Listi D. Sjálvstýrisflokkurin:
Hans Jacob Hermansen, koyrilærari, Tórsbyrgi 16, Tórshavn
Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, Leitisvegur 45, Saltangará
Malan Johansen, fíggjarleiðari, Torfinsgøta 23E, Tórshavn
Óli á Deild Olsen, stjóri, Suðuroyarvegur 5, Tórshavn
Kenneth Rasmussen, leiðari, Heiðavegur 62, Saltangará
Maiken Skaðenni, málsviðgerði, Víkavegur 1, Klaksvík
Jógvan Skorheim, handilslærlingur, Heygavegur 62, Klaksvík

Listi E. Tjóðveldisflokkurin:
Jóannes Eliasen, evnafrøðingur, Leirvík
Kristbjørg Toftegaard, sjúkrarøktafrøðingur, Skáli
Tórbjørn Jacobsen, skipari, Glyvrar
Heini O. Heinesen, borgarstjóri, Kunoy
Karsten Hansen, løgtingsmaður, Heygavegur 67, Klaksvík
Signy Hansen, flakakvinna, undir Hálsi 3, Klaksvík
Heidi Petersen, løgtingskvinna, Miðalsbrekka, Vestmanna
Niklái Petersen, skipsførari, Todnes, Kollafjørður
Sunniva Kollslíð, skrivstovukvinna, Hvalvík
Dánjal Jákup Jakobsen, maskinsmiður, Skálavík
Maiken Krabenhøft, vikarur, Skopun
Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, á Gjógvarábø, Vágur
Jón Guttesen, forritari, Trongisvágur
Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna, Jørundargøta 53, Hoyvík
Høgni Hoydal, løgtingsmaður, Millum Gilja 87, Hoyvík
Kristina Háfoss, búskaparfrøðingur, Torkilsgøta 17, Hoyvík
Martin Dam, vinnurekandi, Kaldbak
Rubek Lillaa, lesandi, Tróndargøta 45, Tórshavn
Sjúrður Skaale, samfelagsfrøðingur, Heygskrókur 6, Tórshavn
Tórhallur Áslaksson, byggifrøðingur, Traðargøta 2, Argir
Maria Jacobsen, skrivstovukvinna, Heinagøta 21, Tórshavn

Listi H. Miðflokkurin:
Charlotta á Váli Olsen, leiðari, í Svanga 1, Tórshavn
Jenis av Rana, lækni, Sóljugøta 10, Tórshavn
Frank Jacobsen, bussførari, Áargeil 13a, Tórshavn
Bill Justinussen, løgtingsmaður, Dalavegur 4, Glyvrar
Vinjard Johansen, leiðari, Eiði
Arni Abrahamsen, bókhaldari, Glyvravegur, Glyvrar
Jan Højgaard, lesandi, Toftir
Jógvan Mortensen, leiðari, Mylnugøta 17, Klaksvík
Mia av Kák Joensen, vikarur, Geilin 8, Sørvágur
Fimmbogi M. Poulsen, arbeiðsmaður, Hvannasund

Uttanflokkalisti:
Johan Dalsgaard, lesandi, Válur

Við ávísing til kap. 6 í »Lov om folketingsvalg på Færøerne« og gr. 25 í somu lóg er omanfyri nevnda uppstilling, uttanflokka, góðkend við 165 stillarum.

Uttanflokkalisti:
Rúni Ellingsgaard, bilførari, Bjarnoyarvegur 20, Tórshavn

Við ávísing til kap. 6 í »Lov om folketingsvalg på Færøerne« og gr. 25 í somu lóg er omanfyri nevnda uppstilling, uttanflokka, góðkend við 155 stillarum.

Tórshavn 30. januar 2005

V. v.

Olaf á Stongunum, fm.

Serfrøðingaálitið um ALS:

# Rættarloysið í politisku skipanini enn einaferð staðfest!

Vit hava her í blaðnum havt ein hóp av frásagnum um rættarloysið í okkara politisku skipan. Í einum rættarsamfelag verður vanliga roknað við, at er "politiskur vilji" at gera eina broyting á einum ella øðrum øki, so verður fyrst kannað, um hetta kann gerast innan fyri galdandi lógarkarmar. Um tað ikki er møguligt, so má lógin broytast eftir ásettari mannagongd. Í Føroyum hevur hetta tó ongan týdning, tí er "politiskur vilji" fyri onkrum, so er ein herur av embætismonnum, sum eru klárir at boyggja og snara galdandi rætti og lóggávu, so tey samsvara við umbidnu niðurstøðurnar.

Og her finst einki mark fyri kreativiteti. Er brúk fyri tí, so verða danskar rættarreglur nýttar. Men hóska hesar ikki til "bíleggingina", so verða føroyskar "serreglur" uppfunnar. Tá hevur tað ongan týdning, um hesar stríða beinleiðis móti teirri fatan av somu reglum, sum eru galdandi í ríkinum annars.

Vit hava eisini dømi um, hvussu lógarreglur, sum eru umsitnar á ein ávísan hátt gjøgnum ártíggir, verða "umtulkaðar" umsitingarliga til skaða fyri borgaran. Hetta er beinleiðis brot á bindandi rættarsiðvenju. Men at fáa hetta broytt er nærum hopleyst. Hetta krevur í hvussu er eitt treiskni, sum tey fægstu hava. Og tað er als ikki vist, at hetta er nóg mikið.

### Bert eitt dømi

Eitt sera "gott" dømi um hetta er spurningurin um ymiskar grunnar, sum t.d. ALS og Realin. Spurningurin í málinum er, hvørt hesir eiga at vera fevndir av fíggjarlóg og/ella landskassaroknskapi. Fyri ALS er spurningurin eisini, hvørt inngjaldið til ALS er at meta sum ein skattur, sum bert kann ásetast av løgtinginum.

Hesin spurningur stakk seg rættiliga upp undan jólum í 2002. Grundarlagið fyri hesum var eitt álit, sum var gjørt í fíggjarmálaráðnum í 2001, har tað varð "prógvað" at sambært stýrisskipanarlógina hoyrdu hesir grunnar heima á fíggjarlógini og/ella í landskassaroknskapinum. Hetta álit varð brúkt av landsgrannskoðaranum at hótta bæði løgmann og landsstýrismenn við "bál og brand" at "fáa hesi viðurskifti í rættlag" sum skjótast. Hetta vildi aftur merkja, at higartil óheftir stovnar og grunnar skuldu koma undir politiskt eftirlit og ræði.

Úrslitið var, at seinast í 2002, gav táverandi løgmaður harraboð um at fremja eina lóggávu, sum var grundað á umrødda álit, og hetta skuldi verða gjørt innan ein mánað. Hansara grundgeving var, at annars kundi hann verða hóttur við einum misáliti í tinginum fyri ikki at fylgja stýrisskipanarlógini.

### Bílagt krotusmíð

Vit onnur dugdu at síggja, at henda grundgeving var sera ivasom. Tað var nógv sum bendi á, at her var talan um bílagt politiskt krotusmíð, hvørs einasta endamál var at skapa lógligt grundarlag fyri at geva politisku myndugleikunum ræðið á umrøddu grunnum. Tað skal leggjast afturat, at so vítt vit vita, hevur eingin løgfrøðingur lagt navn til hetta álit. Hinvegin hevur tað longu frá byrjan av verið alment kent, at ein tann mest royndi løgfrøðingurin í almennu umsitingini hevur víst niðurstøðuni í 2001-álitinum frá sær.

Besta prógv fyri hesum var svarið, sum Realurin fekk, tá hann royndi at vísa á tað ivasama í álitinum. Hann førdi fram, at tann orðing, sum varð nýtt í stýrisskipanarlógini, var tann sama, sum stendur í donsku grundlógini frá 1954. Roknast mátti við, at danskir myndugleikar áttu at vera teir, sum vóru næstir at útleggja tekstin. Afturat hesum hava teir hópin av serfrøðingum júst í tulking av grundlógini.

Realurin hevði verið undir danskari lóg í eini 40 ár við øllum tí eftirliti, sum danska politiska skipanin hevur um, at lógir og grundlógin eiga at verða fylgd.

Realurin kundi vísa á, at hann hevði ongantíð verið á donsku fíggjarlógini ella í statsroksnkapinum, og eingin hevur heldur ført tað sjónarmið fram, at hann átti at verið tað.

Hjá sannleikasøkjandi serfrøðingum skuldi hetta verið ein góð grundgeving fyri í hvussu er at mett um málið av nýggjum við atliti til danska siðvenju á økinum. Men hetta kom als ikki uppá tal. Tað skuldi haldast fast við bíløgdu niðurstøðuna, og so máttu grund-

## Niðurstøður hjá arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin býtti seg í niðurstøðuni í meiriluta og minniluta, meðan semja var um partar av lýsingini av málinum.

**Meirilutin** – Halgir Winther Poulsen, Eyðfinnur Jacobsen, Kári á Rógvi og Sørin Pram Sørensen – ger hesa niðurstøðu:

***ALS-gjaldið*** er neyvan at rokna sum skattur eftir § 41 í stýrisskipanarlógini; og tá skattahugtakið ikki hevur neyvt innihald, eigur tingið at hava stórt rásarúm viðvíkjandi spurninginum, hvørt ávíst gjald skal metast sum skattur ella ikki. Tingið hevur tikið støðu og valt at leggja ALS uttanfyri fíggjarlógina. Tingið umrøddi eisini spurningin, um talan var um skatt. Tað eigur at vera víst afturhaldni við at seta til viks lóggávu, sum bert viðvíkur valdsbýtinum millum stjórnarvøldini. Talan er um lógarásett kravt gjald í tvingaðari tryggingarskipan. Sjálvt um komið skuldi verið til, at talan er um gjald til tað almenna, eru tó allar neyðugar ásetingar um ALS-gjaldið ásettar í lógini, og gjaldið er tí í samvari við § 41. Tann fyri borgaran viðkomandi ásetingin í stýrisskipanarlógini er tí í øllum førum lokin, og spurningurin, um gjaldið skal á fíggjarlógina, er tá bert ein formligur spurningur.

Gjaldið er viðurlag fyri, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum kunnu vera við í eini skipan, sum onki framkomið land kann vera fyri uttan. Talan er ikki um gjald til generella fígging av landskassans útreiðslum, men um markað gjald til ávíst neyvt endamál. Talan er um partvíst solidariska skipan, ið eisini leggur upp fyri verri tíðum, og um avmarkaða heimild at broyta gjaldið innanfyri hámark ásett í lógini. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum stýra skipanini og fæið hjá skipanini er greitt markað til neyvt ásett endamál við tryggingarkendum, solidariskum og uppsparingskendum eyðkennum og goymt í grunni, sum hvørki er partur av fæi ella gjaldføri landskassans, og sum ikki í verki er komin í bland við almenna fíggjarkervið. ALS-gjaldið er í praksis hjá skattamyndugleikunum, síðani lógin kom í gildi, ikki roknað at vera skattur.

ALS er stovnur skipaður sambært lóg, men fæið hjá skipanini er greitt markað til endamál, ið viðkoma pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Var ikki talan um hesa skipan, so høvdu partarnir á arbeiðsmarknaðinum borið útreiðslurnar av eini arbeiðsloysisskipan á annan hátt. At politiski myndugleikin tók stig til hesa skipan broytir ikki støðuna hjá ALS sum sjálvstøðugan stovn við avmarkaðum endamáli.

***ALS-roknskapurin*** er ikki roknskapur hjá almennum stovni, ið fellur undir § 45, stk. 4 í stýrisskipanarlógini. Hóast ALS røkir nøkur almenn atlit og er skipað sambært løgtingslóg, er ALS organisatoriskt og játtanarliga skipað uttan fyri almennu umsitingina, fíggjarlóg og landsroknskap. ALS er tí ikki landsstovnur, og løgtingið skal tí ikki góðkenna árligu roknskapirnar hjá ALS. Heldur ikki eigur fæið hjá ALS at vera tikið við í uppgerð yvir ognir landsins. Til tess at tryggja tey almennu atlitini í skipanini og sum umboð hjá Føroya fólki, eigur løgtingið tó rætt til umvegis landsgrannskoðan og løgtingsgranskoðarar at tryggja sær neyðugt innlit í ALS-roknskapin. ALS er tó longu sum er helst fevnt av ásetingum § 2, stk. 2 í lóg um landsins almenna roknskaparhald og § 15, stk. 1 í lóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

**Minnilutin** – Katrina Maria Johannesen og Jóhan E. Simonsen – ger hesa niðurstøðu:

***ALS-gjaldið*** er mest sannlíkt at meta sum skattur eftir § 41 í stýrisskipanarlógini, hóast tað ikki ber til at koma við eini greiðari løgfrøðiligari niðurstøðu viðvíkjandi hesum spurningi. At ALS-gjaldið mest sannlíkt er at meta við skatt merkir, at mett verður, at inngjaldsprosentið eigur at verða ásett í lógini, eins og broytingar í gjaldinum mugu samtykkjast á løgtingi, serliga um tað, sum í dag, er stýrið, og ikki landsstýrismaðurin, sum við kunngerð kann broyta ALS-gjaldið.

Viðvíkjandi lógini sum heild má samanumtikið sigast, at óansæð hvør løgfrøðiliga grundgevingin er fyri, at lógin er samtykt í verandi líki, ber neyvan til at koma fram til aðra niðurstøðu í dag, enn at skipanin ikki kann sigast at vera ólóglig orsakað av, at lógin ikki er í samsvari við § 41 í stýrisskipanarlógini. Hetta er m.a. grundað á tær serligu umstøður, ið vóru, tá lógin um ALS varð samtykt, at lógin hevur virkað í meira enn 12 ár, og at lógin ikki varð broytt, hvørki í sambandi við lógarbroytingina í 1993, sum sambært viðmerkingunum til lógina breyt við upprunaliga tryggingarprinsippið, ella í sambandi við, at nýggja stýrisskipanarlógin varð sett í gildi.

Tað má tí verða upp til løgtingið at gera av, í hvønn mun skipanin skal varðveitast í verandi líki.

***ALS-roknskapurin*** er fevndur av ásetingini í § 45, stk. 4 í stýrisskipanarlógini. Av tí at innihaldið í ásetingini tykist lítið umhugsað, ber tað illa til at koma við nakrari greiðari niðurstøðu um, hvat tað merkir í mun til landsroknskapin, at ALS verður mett at vera fevnt av § 45, stk. 4 í stýrisskipanarlógini. Tað kann tó neyvan vera nakar ivi um, at tað merkir, at løgtingið eigur at hava eftirlit við roknskapinum hjá ALS. Eftir orðalagnum í ásetingini eigur roknskapurin at verða lagdur fyri løgtingið, men av tí at tað ikki tykist greitt, hvør ætlanin hevur verið við ásetingini í § 45, stk. 4 í stýrisskipanarlógini, og hvussu vítt henda áseting skuldi fevna, ber illa til at koma við eini greiðari niðurstøðu um, hvussu henda áseting skal skiljast í mun til ein slíkan serligan almennan stovn, sum ALS er.

gevingarnar lagast eftir hesum uttan mun til um tær vóru borðbarar ella ikki.

Svarið frá fíggjarmálaráðnum var tí, at hóast **"danskir myndugleikar forbróta seg móti … grundlógini … kann tað ikki rættvísgera, at landsstýrið forbrýtur seg … móti stýrisskipanarlógini um somu viðurskifti."**

Tað er fullkomiliga óneyðugt at gera nakrar viðmerkingar til hetta svar. Tað kann í hvussu er sigast, at tað finst einki grundarlag fyri slíkari betrivitan hjá einum hissini føroyskum starvsmanni.

Men eitt slíkt svar er bert enn einaferð eitt prógv um, at tað er eingin veruligur áhugi í at finna fram til, hvussu stýrisskipanarlógin veruliga skal útleggjast. Tað einasta, sum telur, er at tekkjast "politiska viljanum". Og so verður eitt so grundleggjandi sjónarmið, sum hetta hjá Realinum, skúgvað til viks á umrødda hátt.

Hetta er nevniliga standardurin í almennari løgfrøði í Føroyum í dag. Og tað óhugaliga er, at tað er yngra ættarliðið av embætismonnum, sum standa fyri hesi gongdini. Teir eru til fals fyri eitt gott orð.

Men tað er eins ófrættakent, at politisku myndugleikarnir eingi krøv seta til tey tilmæli tey fáa. Sum oftast er tað lætt at síggja hjá vanligum skilafólki, um eitt tilmæli er undirbygt ella ikki. Men tað er greitt, at her verður bert hugt eftir um niðurstøðan er tann umbidna ella ikki.

### ALS lat seg ikki syfta

Serliga í ALS varð hetta mál tikið í størsta álvara og var hetta mett sum ein politisk roynd at ognartaka hesa skipanina hjá arbeiðsmarknaðinum, nú hon umboðaði eina ogn. Allir partar í ALS settu seg móti hesi kvettroynd. Samstundis varð í FF-blaðnum, sum einasta fjølmiðli, sáddur sera stórur ivi um løgfrøðisliga grundarlagið undir hesi ætlan.

Tíbetur var tað Bjarni Djurholm, ið sum landsstýrismaður varðar av ALS og øðrum aktuellum grunnum. Hann leyp ikki á leistum fyri hesi "serfrøði", og hann gjørdi av at seta ein bólk at endurskoða ALS skipanina í síni heild við serligum atliti til júst hendan spurning.

Hesin bólkur setti so eina serliga serfrøðinganevnd av løgfrøðingum at kanna páhaldið í umrødda áliti hjá fíggjarmálaráðnum frá 2001. Hetta átti so at merkt, at friður varð um spurningin, inntil niðurstøðan her var klár. Men soleiðis varð ikki.

Hvussu illa arbeiðið í almennu umsitingini í okkara pinkusamfelag er skipað, sæst av, at aðrir landsstýrismenn – hóast hetta – hildu áfram at arbeiða út frá umrødda 2001-áliti, sum um tað var tann einasti sannleikin í hesum málinum. Og tað var bert valið í januar 2004 sum forðaði fyri, at uppskot vórðu løgd fram á ting, sum vóru grundað á hetta álit.

Sum kunnugt fingu vit eitt nýtt landsstýri, og hvussu lítlan týdning tað hevur, um vit hava eitt ella annað landsstýri sæst av, at tað eftir landsstýrisskiftið framvegis varð arbeitt við lógaruppskotum eftir leistinum í 2001-álitinum, sum t.d. við forskotsgrunninum hjá fiskimonnum. Men tað eydnaðist nevndini í grunninum at fáa sannført fiskimálaráðið um, at nú mátti bíðast til tað fekst greiða á hesum spurningi í umrøddu serfrøðinganevnd.

### 2001-álitið sópað av borðinum

Arbeiðið hjá serfrøðinganevndini hevur tikið alt ov langa tíð. Men hon varð so liðug við sítt arbeiði tann 19. januar 2005. Tað áhugaverda í hesum álitinum er, at tað tekur fullkomiliga grundarlagið burtur undir 2001-álitinum. Í serfrøðinganevndini hava sitið 6 limir. Hesir hava býtt seg í ein meiriluta uppá 4 og ein minniluta uppá 2. Í meirilutanum er m.a. næstformaðurin í grundlógarnevndini, sum verður roknaður sum ein tann fremsti serfrøðingur júst í stýrisskipanarmálum. Ein annar er mest royndi løgfrøðingurin í almennu umsitingini.

Hetta er ein sera drúgv frágreiðing, sum telur meira enn 50 síður og liggur hon – øll sum hon er – á heimasíðuni hjá fiskimannafelagnum:

www.fiskimannafelag.fo

Í blaðnum endurgeva við ein samandrátt av niðurstøðunum bæði hjá meirilutanum og hjá minnilutanum. Meirilutin avvísir fullkomiliga niðurstøðuna í 2001-álitinum, meðan minnilutin ikki er so avgjørdur. Hann ásannar tó, at stýriskipanarlógin í sær sjálvum ikki er ein fasittlisti til slík torfør mál sum hesi.

Stórt sæð kann sigast, at semja er um, at hetta er ein reint politiskur spurningur, sum politiska skipanin má taka støðu til uttan at verða hótt av meira ella minni ógreiðum reglum í stýrisskipanarlógini.

### Eru aftur har vit byrjaðu

Hervið eru vit aftur, har vit byrjaðu. Vit, sum avvístu 2001-álitið, hava fingið váttað okkara fatan av, at vit høvdu rætt. Samstundis kann staðfestast, at umrøddu kravboð frá løgmanni vóru uttan nakað grundarlag, og alt arbeiðið, sum er gjørt á hesum økinum, er grundað á óundirbygdar pástandir.

Ein hópur av kreftum, og sekssifraðar advokatrokningar, eru brúktar til nøkur formell viðurskifti í viðurskiftum sum annars rigga væl í tí dagliga. Samstundis er eingin hond rætt frá síðu fyri at loysa teir veruligu trupulleikarnar í umsitingarligu og politisku skipanini.

Hóast arbeiðið í serfrøðingabólkinum kann tykjast at hava verið óneyðugt, so er tað kortini sera læruríkt. Tí her sæst greitt munurin millum veruliga løgfrøði og so ta "serføroysku" bíleggingarløgfrøði, sum er tann valdandi í almennu umsitingini. Meirilutin í serfrøðingabólkinum eru royndir advokatar + almennur løgfrøðingur frá teirri tíðini, tá løgfrøði var løgfrøði, t.v.s. áðrenn tann "serføroyska" løgfrøðin kom í hásætið. Teirra tilmæli er logiskt uppbygt og ber til at skilja hjá vanligum fólki, beint mótsatt 2001-álitið.

Hetta málið vísir eisini hvussu vandamikið tað er at grunda sínar avgerðir á "sólaklárar" niðurstøður hjá einstakum embætismonnum, sum bert vilja tekkjast makthavarunum. Einki mál er bert svart ella hvítt, og tað er hetta heldur ikki. Nýggja álitið krevur í hvussu er eina viðgerð og eina støðutakan.

Hóast hetta er henda søgan líka við at endurtaka seg, nevniliga í WTO-málinum, har einstakur embætismaður júst sum við 2001-álitinum hevur lagt fram eina "sólaklára" niðurstøðu, sum við nærri eftirkannan er eins ivasom og 2001-álitið hjá fíggjarmálaráðnum.

### Eingin bremsa

Trupulleikin er, at tær eftirlitsskipanir, sum skuldi verið í samfelagnum virka ikki. Tað vísir seg, at uttan mun til hvussu tað verður manipulerað við løggávuni, so er ikki so mikið sum ein tingmaður, sum ger vart við seg, hóast tað júst er teirra uppgáva at vera á varðhaldi.

Enn minni ger sokallaða 4. statsmaktin nakað sum helst. Hennara uppgáva tykist bert vera at tekkjast maktapparatinum. Tað er bert FF-blaðið sum hevur lýst og viðgjørt hetta, og sum hevur víst á, at m.a. í hesum málinum er talan um reint lógloysi.

Høvdu tað ikki verið kreftir uttan fyri politisku skipanina, sum gjørdu bart, høvdu kravboðini hjá løgmanni í 2002 verið trumlað gjøgnum tingið við teimum rættarbrotum, sum hetta vildi ført við sær.

Hetta er fólkaræðið í Føroyum!

# Hvat kann gerast fyri at fáa livrina til høldar?

## Longu tá livravirkið á Eiði var í umbúnað var greitt, at tað kundi gerast ein trupulleiki at fáa fatur í nóg mikið av livur.

Í 70-unum vórðu royndir gjørdar við livraframleiðslu, og hesar endaðu við, at livravirkið í Gøtu pakkaði saman. Í staðin varð farið í holt við høvdaframleiðslu í Leirvík, og hevur hetta verið ein heilt onnur forrætning.

Tað er spell, at livurin ikki fæst til høldar, serliga tá hugsað verður um, at hetta hevur borið til fyrr. Og hon umboðar eitt rættiliga stórt virði, sum fyri ein part kundi komið til sættis. Men sakin er tann, at fiskimenn taka ikki livur, um teir ikki merkja, at tað loysir seg í mun til stríðið, sum er av tí. Tað at taka livur seinkar nevniliga arbeiðinum umborð rættiliga nógv.

Umstøðurnar at taka livur eru eisini sera ymiskar. Eru menn frammanundan sperdir av at kryvja smáan fisk, so kann ikki krevjast av teimum, at teir skulu gera sær eyka ómak eisini at taka livur. Men í øðrum førum má tað kunna bera til.

Tað er greitt, at FF tekur undir við, at alt tilfeingi kemur til høldar, og at livur verður tikin, har hetta er gjørligt. Tað er í hesum sambandi, at vit í seinasta sáttmála fingu eina reglu um, at reiðarí og manning kunnu avtala annað og betri býti fyri livur enn tað, sum er avtalað í sáttmálanum annars. Og her kann sigast, at uttan mun til hvussu lítlan part reiðarin fær, so vil tað loysa seg hjá honum, at manningin tekur livur og harvið økir virðið á veiðuni.

Men hetta valdast eisini, hvat fæst fyri livrina, og her skilja vit, at livravirkið spennir seg so nógv út sum gjørligt, og hetta kann bert gagna teirra sak.

So er spurningurin hvat tað almenna kann gera. Og her kann verða víst til eitt uppskot, sum varð samtykt á tingi í 1999, har tað varð skotið upp, at í 1999, 2000 og 2001 skulu seljarar av fiskalivur rinda eitt avgjald upp á 25%. Afturfyri skuldi inntøka hjá fiskimonnum av livrini ikki roknast við í vanligu árligu skattskyldugu inntøkuna hjá teimum.

Henda løggávan kom ikki at hava nakra ávirkan, tí avgjaldið varð sett ov høgt, helst av ókennskapi til sáttmálaskipanina hjá fiskimonnum.

Landsstýrið átti at tikið hendan leistin upp aftur, men við einum lægri avgjaldi t.d. einum 5%. Í tann mun hetta hevði virkað, hevði tað gagnað bæði landskassanum og annars vinnu og samfelag sum heild.

Hetta er okkara tilmæli til myndugleikarnar. Og tað er eina roynd vert at vita, um tað ikki við hesum tiltøkum hevði komið gongd á.

Ein annar spurningur er kryvjing á landi av nýveiddum fiski. Hetta hevði spart arbeiði umborð, og inntøkan av livrini kundi kanska goldið útreiðslurnar av kryvjing, um hetta varð nóg væl fyriskipað.

Tíðindaskriv frá Faroe Marine Biotech:

# Livraprísurin kr. 5 pr. kg.

Í november mánaða í 2004 byrjaði P/F Faroe Marine Biotech (FMB) at taka ímóti livur frá skipum og bátum. Lagt varð út við einum kiloprísi áljóðandi 3 krónur. Nú 3 mánaðir eru gingnir, mugu vit ásanna, at rávørutilgongdin ikki hevur verið tann, vit høvdu roknað við. Tað, sum nú er av stórsta týdningi fyri okkum er, at ein týðandi livramongd kemur til virkið. Leiðslan hevur tí tikið avgerð um, at vit í eini royndartíð uppá 2 mánaðar frá 1. februar 2005 taka vit ímóti allari livur fyri ein prís áljóðandi 5,00 kr kilo. Tó gevur hávalivur ein hægri prís áljóðandi 8 krónur kilo. Fíggjarliga fer hetta átak bert at lata seg gera, um hvør í sínum lagi roynir:

– at strembað verður eftir, at livranøgdin, ið seld verður til FMB, er so stórur prosentpartur sum gjørlig av tí fiskamongd, ið veidd verður hvønn túrin. Roknast kann við at livraparturin rokna yvir alt árið í miðal er 8 til 10%.
– at livurin verður handfarin soleiðis, at góðskan er fyrsta floks. Her er av stórsta týdningi, at hýsulivur ongantíð má verða latin í sama livraposa sum onnur livur. Annars verður í hesum sambandi víst til vegleiðingina frá FMB.

Føroya-myndirnar hjá Ingvar Ånstad 2. partur:

# Fleiri myndir frá "Sildrekanum", anno 1964

Í næstseinasta blaðið prentaðu vit myndir tiknar undir sildafiskiskapi hjá "Sildrekanum" í 1964 tiknar av tí tá bert 16 ára gamla svenskaranum Ingvar Ånstad, syni Olov Ånstad, myndamanni. Myndirnar hesuferð eru tiknar av framsýningartúrinum, umframt myndir tiknar við bryggju í Havn, og myndir tiknar á brúnni. Vit lata myndirnar tala fyri seg.





























# Manningin er av Hero






"Hero".

Manningarmyndin í seinasta blaði er av "Hero", og er hon helst eins og nógvar aðrar líknandi myndir tikin av Absalon Joensen í 1924. Hendan myndin er eisini í Siglingarsøguni, bind 9. Menninir eru:

1. Niklái Joensen, í Homrum, Kollafjørð.
2. Hans Fonsdal.
3. Jóannes Fonsdal, skipari,
4. Jóannes Fonsdal, motorpassari
5. Dánjal Hansen, Mykines
6. Marius Næs, Miðvágur
7. Jesar Joensen, Mykines.
8. Jákup Pauli Hermansen, Hósvík
9. Andreas Petersen, bestimaður, Kvívík.

Jóannes Fonsdal í Vestmanna keypti Hero úr Lysekil í Svøríki í 1919. Hon var bygd í Hull í 1888 og var 73 brt. Teir høvdu eina sera ringa heimferð, og er greitt frá henni í Siglingarsøguni. Jóannes førdi sjálvur Hero til 1926, tó undantikið vártúrarnar í 1922 og 1923.

## Myndin av Silver Lining

Vit hava fingið fleiri fyrispurningar um manningina á "Silver Lining" í seinasta blað. Tað sum vit skrivað samsvarar ikki við tekstin til somu mynd í bókini "Kaj". Til hetta er stutt at siga, at tað sum vit skriva er tað rætta. Hetta er nevniliga váttað frá fleiri keldum.

# Guðrun Zoega

Vit hava nú fingið alla manningina á hesi mynd. Hon er av "Guðrun Zoega" í 1924, sum N.J.Mortensen átti.

1. Johan Johansen, kallaður Lítli Johan, Niðri á Trøð, Strendur.
2. Helst Poul Marius Poulsen av Skála
3. Jógvan Johannesen, á Grund, Strendur.
4. Hans Andreassen, Hanus á Kýrheygnum, Haldarsvík
5. Kristian Johansen, vanliga róptur Gammi, í Stovugerði, Strendur.
6. Símun Danielsen, Úti í Húsi, Strendur.
7. Lassi Johansen, á Trønni, Strendur.
8. Poul Poulsen, í Trønni, Skála.




Vitja eisini heimasíðuna hjá Føroya Fiskimannafelag
www.fiskimannafelag.fo




# Altíð tann sami

Jesus Kristus er í gjár
og í dag hin sami og um ævir!
*Heb.13,8*

Ein sjómaður segði einaferð frá, at nú hevði hann verið aftur í Grimsby í Onglandi.

At koma aftur til býin, var eitt gamalt ynski hann hevði borið uppá í mong ár.

Sum ungur kom hann nógv við skipi til Grimsby. Tá kendi hann havnina og fleiri fólk í býnum. Honum dámdi so væl í Grimsby.

At nda segði maðurin hugtungur, at hann iðraði seg yvir, at hann fór aftur til Grimsby.

Upplivingin gjørdist eitt sætt vónbrot. Einki var, sum tað einaferð var. Alt var broytt.

Hann hevði heldur viljað goymt tey góðu minnini í huganum, enn at síggja "alt" aftur, og tó "einki" síggja aftur.

Tíðin og menningin krevur sítt. Vit føðast, mennast, eldast og vikna fyri síðani at doyggja. Mangan verður sagt – og við røttum, at "tíðin setir sín dám á alt!"

Hetta er rætt, tó við einum undantakið:

"Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um ævir! Heb.13,8

Hetta eru sonn gleðiboð inn í alt tað umbroytandi, ótrygga og hóttandi vit uppliva.

Jesus broytist ikki. Hann hvørki viknar, eldist, stívnar ella broytir hugsan og atburð.

Hann vísir sama kærleika, náði og umsorgan í dag sum ár 33.

Hann frelsir og varveitir nú sum tá.

Lyftir, vegleiðingar, áminningar ... hansara galda nú sum tá.

Ávaringar, dómsorð ... hansara galda nú sum tá.

Hann tekur menniskja í sama álvara nú sum tá.

Hann loysir syndaleinkjur og syndatrupulleikar nú sum tá.

Jesus er óbroytandi. Orð hansara eru meiri álítandi enn alheimurin, fjøllini, klettarnir ... Hann segði: "Himmalin og jørðin skulu ganga undir, men orð míni skulu ikki ganga undir!" Matt.24,35.

Gev lív títt í Jesu hendur, og tú verður frelstur, leiddur og um neyðugt borðin av tí almáttuga, óbroytandi frelsara í lívi, í deyða og í uppreisnini. Sálig støða.

Tann kristni kennir heldur ikki morgindagin. Kortini veit hann eitt púra vist um hann.

Jesus er har. Hann var í gjár, er í dag, verður í morgin og um ævir tann sami.

Bind tí lív títt, henda dag, morgindagin ... at Jesusi, og tú torir at liva og at doyggja.

*Í gjár, í dag, ja, alla tíð*
*hin sami Jesus er,*
*hann hjálpir tær, tá ið tú ert í neyð.*
*Tá syndabyrðan tyngir teg,*
*hann kemur tær so nær,*
*tí hann vil bjarga tær frá synd og deyð.*
*Ms.330*

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein

18. januar
Eitt lot av eystri og 17,8 kuldastig
"Kiliutaq" kom inn í morgun at landa gott 300 tons.

20. januar
Andøvsgul av landsynningi og 16,1 kuldastig
"Lómur" kom inn nú seinnapartin at landa 75 tons av góðum rækjum. Ætlanin var at fara nýggjan túr á midnátt, men hetta var útsett til í morgin. Teir vilja síggja tað nýggja ískortið, fyri at vita um tað er ráðiligt at fara norður eftir at royna.

21. januar
Vindur av suðri og 4,8 kuldastig.
Ísurin, ið hevur ligið inn á land, er nokk allur í sorli.
Í gjár kom ein av teimum smáu rækjutrolarunum, ið er heimahoyrandi her, inn at landa gott 27 tons. Hann lastar 37 tons og hava teir frystiorku til at kunna fylla skipið eftir tveimum døgum, men prísurin á rækjunum er ikki góður.
Alt verður fryst í blokk og sent til Polar Seafood í Nuuk, ið teir hava eina avtalu við. Prísurin liggur í løtuni millum 4,- og 11,- krónur fyri kilo, alt eftir støddini á rækjunum, so teir verða noyddir at gera nakrar túrar um árið. Henda túrin var prísurin knappar 6,- krónur fyri kilo.
"Sermersuut" landar í Manitsoq í dag, teir hava gott 230 tons inni.


"Ocean Tiger".

25. januar
Stilli og 4,8 kuldastig. Nakrir av teimum smærru rækjutrolarunum úr Illulisaat eru komnir higar. Teir hava brotið seg ígjøgnum ísin, sum hevur ligið tætt í klettin norðanfyri. Tað sigst at teir ikki sleppa at landa her í Sisimiut, men skulu suður til eitt virki í Narrsaq at landa, tí at her eru ov nógvir bátar fyri tíðina.
"Lómur" skal landa í Aassiat so leingi tað ber til at fiska har norðuri fyri ísi.
Í kvøld kom hann við vindi av landnyrðingi og oysandi regni, so tað var heldur várligt, áðrenn mann varnaðist. Annars lova veðurmenninir storm av suðri við regni og vátaslettingi ímorgin.
"Akamalik" er á veg inn at landa gott 300 tons. Teir vóru so óhepnir at missa klumpin – teir kalla – til dupulttrolið. Hann datt við einum ógvusligum braki niður í sliskuna og á bláman. Sliskan fekk ongan skaða av stoytinum, so sterkt er bygt.

26. januar
Stormur av suðri og 1,7 hitastig. Tað glaðar inn ímóti.
"Hanseraq" kom inn at landa um 30 tons. Tað hevur ikki viðrað væl, har teir hava roynt.

27. januar
Blika logn og 0,9 hitastig.
"Ocean Tiger" kom inn í morgun at landa. Teir hava verið úti í 3 vikur og hava fult skip. Henda túrin hava teir kókað um 70 tons. Annars er tað mest posarækjur. Tá ið liðugt er at landa, verður farið til Eysturgrønlands at royna.
"Lómur" kom til Aasiaat í morgun at landa gott 60 tons og fóru longu nýggjan túr seinnapartin.

29. januar
Eitt lot av eystri og 10 kuldastig. "Natarnak" kom inn í morgun at landa gott 400 tons. Rokna við at fara nýggjan túr seinnapartin ímorgin.

# Kann nakar vátta hesa myndina?



Í Sosialinum var undan jólum ein fråsøgn um ein enskan trolaramann, William Robert Reader, sum druknaði í Vestmanna í 1946, og sum varð grivin í Havn.
Í fyrraárið kom dóttirin saman við manni at leita eftir grøvini hjá pápanum, og hetta eydnaðist eisini. Grøvin fekk ein stein, og tey bæði vóru so aftur í fjør og vitjaðu grøvina.
Í hesum sambandi endurprentaði blaðið Kolon í 1979 eina mynd frá jarðarferðini.
Men síðan hevur ivi stungið seg upp, hvørt myndin veruliga er frá hesi jarðarferðini. Tað sær út, sum at øll manningin er í nýggjum føroyskum troyggjum, og hetta kundi bent á, at talan er um eina manning frá skipi, sum er sokkið, og har ein av manningini er druknaður.
Nógvir av okkara lesarum kenna væl til slíkar hendingar. So spurningurin er, um nakar teirra kann siga okkum, um henda myndin er frá umrøddu jarðarferð, ella um talan er um eina aðra hending.


**Starvslønir**
**til listaligt og mentanarligt arbeiði**

Mentanargrunnur Landsins letur umsøkjarum starvslønir við støði í listaligum og fakligum metingum av verkevni ella verkætlan.

Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir.

Starvslønirnar kunnu verða latnar soleiðis:
1 starvsløn galdandi í 3 ár og starvslønir galdandi í 1 mánað til 12 mánaðir.

Upphæddin á starvslønini svarar til læraralønina á fólkaskúlans lønarstigi 21, stigi 1, sum eftir 1. okt. 2004 er kr. 21.335,70 um mánaðin.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 11. februar 2005**

**Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni ella á skrivstovuni.**
**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn Tlf. 32 08 42 - fartlf. 21 80 13 - fax 31 19 98
mentan@post.olivant.fo - **www.mentanargrunnur.fo**



**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

DANAK
DNV

**FARPACK**
Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com



**Línubustir og goggar**
Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar



Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

**Fløttislið** (limur í Føroya blindafelag)

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569




Eg hevði eitt hald í rygginum og fór skjølkandi á Apotekið. At enda fann eg tað, ið eg leitaði eftir. Nakrar hitapútir til fólk, ið hava ilt í rygginum – tær lógu allar saman á niðastu hill.

*****

"Eg havi funnið eina góða uppskrift uppá tebollar við fáum kalorium," segði vinkonan hjá mær og gav mær nakrar við heim.

"Teir smakka ófført", segði maður mín, aftaná at hava eti nakrar – við einum tjúkkum lagi av smøri og súltutoy uppiá.

*****

Eitt kalt vetrarkvøld sótu eg og maðurin á gólvinum framman fyri brenniovninum og hugdu í sjónvarp. Tá ið lýsingarnar komu á skermin, rætti maðurin hondina fram og klemmaði vinarliga fótin á mær. "Mmmm", segði eg. "Hetta kennist væl."

"Satt at siga", viðgekk maðurin, "so helt eg at tað var fjarstýrarin."

*****

Ein fullur maður var á veg til hús, og fyri at stytta um túrin, gekk hann í gjøgnum kirkjugarðin, men datt í eina nýgrivna grøv. Upp aftur slapp hann ikki, so hann legði seg bara at sova.

Morgunin eftir hoyrdi gravarin onkran í venaði seg. Hann kannaði eftir og fann mannin í grøvini, sum gramdi seg um at hann var so kaldur.

"Tað er ikki so løgi", segði gravarin, "tú hevur jú sparka alla moldina av tær."

# Nýggjur trolbátur til Toftir

Orð og myndir: Torleif J.

Hósdagin 27. januar kom nýggi trolbáturin "Randi" til Toftir. Tað er Jens Jacob Olsen, sum hevur keypt bátin úr Danmark.

"Randi" er bygd í Pólland í 1989. Hon er 19,52 metrar long og 5,80 metrar breið. Maskinan er ein 402 hk. Caterpillar. Hon tekur 350 kassar í lastina á 45 kilo.

Jens Jacob er garvaður sjómaður. Hetta er triði báturin hjá honum, ið allir hava kallast "Randi". Í 1979 keypti hann fyrsta bátin, sum var ein 20 tonsari. Í 1990 keypti hann næsta bátin sum var ein 50 tonsari. Nú hevur hann so keypt triðja bátin, sum eisini er 50 tonsari. Hetta er ein stálbátur, meðan hinir hava verið træbátar.

Í heyst fór Jens Jacob niður til Hanstholm fyri at gera ábøtur á "Randi". Tá var ikki ætlanin hjá honum at fáa sær annan bát. Meðan hann er í Hanstholm, fær hann eyga á bátin, sum tá kallaðist Jøkull og var til sølu.

Honum dámdi bátin væl og keypti hann fyri 2,5 milliónir kr.

Síðani er nógv gjørt við bátin. Hann hevur verið í Skagen, har hann er lutvíst yvirdekkaður, sandblástur og metalliseraður o.a. Hetta kostaði umleið 2,4 mill. kr. Jens Jacob sigur, at báturin er sostatt í fínasta standi. Nýggja "Randi" fær fiskiloyvið hjá gomlu "Randi", sum er sett á sølulista.

Okkurt er eftir at gera við bátin áðrenn hann fer til fiskiskap.

Millum annað so skal FJM í Runavík seta fabrikkina upp, sum teir hava gjørt til bátin. Jens Jacob roknar við, at teir verða klárir at fara til fiskiskap um 2-3 vikur.

Eigara og mannin verður ynskt tillukku og Guds signing við bátinum.



Jens Jacob Olsen hevur keypt "Randi" úr Danmark. Hetta er triðja "Randi", sum hann hevur havt.



*Hósdagin, 27. januar, kom nýggi trolbáturin "Randi" flagskrídd inn á Toftir.*

## dagsins MYND

Inni í blaðnum hava vit eina áhugaverda frásøgn um fjølbroytta virksemið hjá Valdemar Lützen. Millum hetta var framleiðsla av konserves, sum er byrjað fyri umleið 100 árum síðani. Hetta sigur nakað um, at teir "gomlu" á mongum økjum tá í tíðini vóru fremri enn í dag.

Her hava vit tvær av etikettunum. Og sigast kann, at sjálvt í dag við útbúnum grafikarum og allari telduútgerð kundi hetta ikki verið gjørt betri. Sanniliga var talan um undangongumenn!

